Kunngerðablaðið A

2010 Hefti 9

ISSN 0907-905X

Nr. 23 23. apríl 2010

**Kunngerð**
**um**
**maskinsmiðútbúgving**

Við heimild í § 4, stk. 1, § 8, stk. 3, § 14, stk. 1 og 2, § 16, stk. 2, § 17, stk. 2 og § 18, stk. 2 í løgtingslóg nr. 94 frá 29. desember 1998 um yrkisútbúgvingar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 15 frá 16. mars 2006, verður ásett:

## Kapittul 1
## Stevnumið og bygnaður

**§ 1.** Útbúgvingin skal menna fakligu og persónligu førleikarnar hjá lærlinginum, so at hann kann taka virknan lut í einum fólkaræði og er førur fyri at samstarva, bæði í heimligum og altjóða høpi. Útbúgvingin skal eggja lærlinginum til at loysa fakligar og samfelagsligar spurningar, og samstundis hava fyrilit fyri umhvørvinum. Útbúgvingin skal somuleiðis gera lærlingin tilvitandi um, hvussu týðandi tað er at taka stig, vera liðiligur og at seta í verk, eins og eitt munagott grundarlag fyri framhaldandi at dagføra og menna sínar førleikar.
*Stk. 2.* Tann útlærdi maskinsmiðurin skal kunna starvast sjálvstøðugt og í samsvari við galdandi lógir.
*Stk. 3.* Maskinsmiðurin skal kunna finna brek, umvæla, góðskutryggja og halda viðlíka maskinútbúnað.
*Stk. 4.* Skúlagongdin fer fram á føroyskum yrkisskúla.

**§ 2**. Útbúgvingin skal geva lærlinginum førleika at:
1) útinna tað handverk, ið er knýtt at arbeiðinum,
2) leggja grundarlag undir framtíðar yrki og framhaldandi útbúgving,
3) menna tann einstaka og hjálpa viðkomandi til samfelagsliga fatan,
4) samstarva við sínar arbeiðsfelagar og leiðsluna á virkinum,
5) leggja arbeiðið til rættis á skilagóðan hátt, og
6) seta seg inn í galdandi reglur og lóggávu innan starvsøkið.

**§ 3**. Lærutíðin í yrkisútbúgvingini maskinsmiður er 4 ár.

**§ 4**. Skúlagongdin er 55 vikur.
*Stk. 2.* Býtið millum verkligu læruna og skúlagongdina er skipað soleiðis:
1) verklig læra,
2) 1. skúlaskeið, 20 vikur,
3) verklig læra,
4) 2. skúlaskeið, 10 vikur,
5) verklig læra,
6) 3. skúlaskeið, 10 vikur,
7) verklig læra,
8) 4. skúlaskeið, 10 vikur,
9) verklig læra,
10) 5. skúlaskeið, 5 vikur, og
11) verklig læra restina av lærutíðini.

## Kapittul 2
## Innihaldið í útbúgvingini

*Skúlaparturin*

**§ 5.** Samlaða skúlagongdin í maskinsmiðútbúgvingini er 2200 tímar, av hesum er skemalagda undirvísingartíðin 1980 tímar, samanber § 4, stk. 2 í kunngerð um felags reglur fyri yrkisútbúgvingar.
*Stk. 2.* Skemalagda undirvísingartíðin er lutað sundur sambært § 12, stk. 2 í lógini.

**§ 6.** Skemalagda tímatalið til yrkislærugreinir er tilsamans 1300 tímar við hesum lærugreinum:

| |
|---|
| Tilfarslæra |
| Framleiðsla og tænasta |
| Samanføringar, montaga og smiðjuarbeiði |
| Skipsmontaga |
| Yrkistekning |
| Spóntakandi arbeiði |
| Stýringartøkni |
| Mátitøkni |
| Handfaringartøkni |
| CNC-tøkni |
| Motor |
| Fyrstahjálp og brand |

*Stk. 2.* Høvuðsevnini í yrkislærugreinunum og tímabýtið verða neyvari lýst í lesiætlan fyri hesar lærugreinir sambært kunngerð nr. 59 frá 14. september 2004 um lesiætlanir fyri yrkislærugreinir.

**§ 7.** Skemalagda tímatalið til almennar lærugreinir er tilsamans 480 tímar við hesum lærugreinum:

| *Lærugrein* | *Tímatal* |
|---|---|
| Føroyskt E | 80 |
| Enskt E | 80 |
| Støddfrøði E | 80 |
| Alisfrøði E | 80 |
| Arbeiðstilrættarlegging og kundatænasta E | 80 |
| Samfelagsfrøði E | 80 |
| *Tímatal tilsamans* | *480* |

**§ 8.** Skemalagda tímatalið til vallærugreinir er tilsamans 200 tímar, og innihaldið verður neyvari lýst í viðkomandi lesiætlan.

*Verkligi parturin*

**§ 9.** Á læruplássinum skal lærlingurin fáa gjølliga vegleiðing í og duga allar viðkomandi arbeiðsuppgávur, sum hoyra til maskinsmiðyrkið. Verkligi parturin skal leggjast soleiðis til rættis, at lærlingurin fær royndir og støðugt mennir sínar førleikar innan maskinyrkið. Lærlingurin skal duga:

1) at skipa arbeiðsgongdir á spóntakandi maskinum,
2) at tilevna og samla lutir til brúkiligar eindir, og
3) at klárgera og nýta maskinlutir, maskinur og maskinskipanir herundir at røkja og umvæla hesar.

*Stk. 2.* Hesar uppgávur verða neyvari lýstar í lesiætlan fyri verkliga partin, ið avvarðandi yrkisnevnd tilevnir og góðkennir.
*Stk. 3.* Upplæring innan tey ymsu arbeiðsøkini verður váttað í eini logbók, sum lærupláss og skúli hava skyldu til at føra.
*Stk. 4.* Lærlingur, skúli og lærupláss nýta logbókina, sambært. stk. 3, í samskiftinum sínámillum, so hvørt sum útbúgvingin líður.

## Kapittul 3
## Eftirmeting áðrenn sveinaroynd

*1. skúlaskeið*

**§ 10.** Eftir 1. skúlaskeið verður hildin roynd í yrkislærugreinum og próvtøka í almennum lærugreinum sambært § 13 í kunngerð um felags reglur fyri yrkisútbúgvingar.
*Stk. 2.* Í almennum lærugreinum, sum Mentamálaráðið tekur út, verður farið til próvtøku tvær ferðir í 1. skúlaskeiði.
*Stk. 3.* Próvtøkurnar í almennum lærugreinum fara fram sambært ásetingum í lesiætlanini fyri einstøku lærugreinina.

*Fylgjandi skúlaskeið*

**§ 11.** Fakliga støðið hjá einstaka lærlinginum skal í øllum fylgjandi skúlaskeiðum eftirmetast sambært § 19 í kunngerð um felags reglur fyri yrkisútbúgvingar.
*Stk. 2.* Í almennum lærugreinum, sum Mentamálaráðið tekur út, verður farið til próvtøku eina ferð í 2. skúlaskeiði.

## Kapittul 4
## Sveinaroynd

**§ 12.** Tá ið lærlingurin hevur staðið skúlapartin, og áðrenn lærlingurin hevur lokið verkligu læruna, verður farið til sveinaroynd.
*Stk. 2.* Treytin fyri at verða tikin upp til sveinaroynd er, at lærlingur hevur staðið øll skúlaskeiðini sambært § 10 og §11.
*Stk. 3.* Sveinaroyndin er býtt upp í tveir partar:

1) skrivlig roynd, og
2) verklig roynd.

*Stk. 4.* Tann skrivliga royndin er ein samansett roynd innan yrkislærugreinirnar. Loyvdir hjálparmiðlar í hesum sambandi eru fylgiskjøl og lummaroknari, góðkend av skúlanum. Lærlingurin fær 120 minuttir til at svara spurningunum.
*Stk. 5.* Til verkligu royndina verður ein uppgáva gjørd í sambandi við skúlaundirvísingina og ein munnlig framløga við støði í innihaldinum í verkligu uppgávuni.
*Stk. 6.* Tann verkliga uppgávan verður annaðhvørt gjørd einsæris ella í bólki.
*Stk. 7.* Lærlingurin ella bólkurin fær 56 klokkutímar til verkligu uppgávuna og 20 minuttir til framløguna.

**§ 13.** Fyri at standa sveinaroyndina skal próvtalið fyri ávikavist skrivligu og verkligu royndina ikki verða minni enn 6.
*Stk. 2.* Fyri skrivliga partin av sveinaroyndini geva lærarin og báðir metingardómararnir eitt felags próvtal.
*Stk. 3.* Fyri verkliga partin av sveinaroyndini geva lærarin og metingardómararnir eitt felags próvtal fyri:

1) útinning av verkligu uppgávuni, og
2) munnliga yvirhoyring í maskintøkniliga innihaldinum í uppgávuni.

*Stk. 4.* Endaliga próvtalið av sveinaroyndini er miðaltalið av teimum givnu próvtølunum, rundað til næsta próvtal eftir próvtalsstiganum. Liggur miðaltalið ímillum tvey próvtøl, verður rundað til hægra próvtalið.

*Sjúkra- og endurroynd*

**§ 14.** Sjúkra- og endurroynd verður skipað samsvarandi § 6, stk. 2 í kunngerð um próvtøkur í yrkis- og serlærugreinum og fremjingarreglur fyri yrkis- og sveinaroyndir, samanber eisini § 2, stk. 2 í kunngerðini um próvtøl (próvtalskunngerðin).

**Kapittul 5**
**Gildiskoma**

**§ 15**. Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og er eisini galdandi fyri lærlingar, sum hava byrjað læruna, áðrenn kunngerðin kemur í gildi.

Mentamálaráðið, 23. apríl 2010

**Helena Dam á Neystabø (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Leivur Harryson (sign.)

# Kunngerð um hárfríðkaraútbúgving

Við heimild í § 4, stk. 1, § 8, stk. 3, § 14, stk. 1 og 2, § 16, stk. 2, § 17, stk. 2 og § 18, stk. 2 í løgtingslóg nr. 94 frá 29. desember 1998 um yrkisútbúgvingar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 15 frá 16. mars 2006, verður ásett:

## Kapittul 1
## Endamál og bygnaður

**§ 1**. Útbúgvingin til hárfríðkara skal:
1) geva lærlinginum førleika at útinna tað handverk, ið er knýtt at arbeiðinum,
2) leggja grundarlag undir framtíðar yrki og framhaldandi útbúgving,
3) menna tann einstaka og hjálpa viðkomandi til samfelagsliga fatan,
4) geva lærlinginum førleika at samstarva við sínar arbeiðsfelagar og leiðsluna á virkinum, og
5) geva lærlinginum førleika at tilrættaleggja arbeiðið á skilagóðan hátt.

*Stk. 2.* Útbúgvingin skal eisini geva lærlinginum førleika fyri sjálvsstøðugt og vandaliga at útinna:
1) klipping,
2) frisering,
3) permanent,
4) liting, og
5) gera skitsur av klippingum og friseringum til kvinnur og menn.

**§ 2.** Lærutíðin í yrkisútbúgvingini hárfríðkari er 4 ár.

**§ 3**. Skúlagongdin er 60 vikur, umframt sveinaroynd í 2 dagar.

*Stk. 2.* Skúlagongdin er sett saman av 1. skúlaskeiði á 20 vikur og 4 fylgjandi skúlaskeiðum á 10 vikur, umframt 2 dagar til sveinaroynd.

*Stk. 3.* Skúlagongdin fevnir um yrkislærugreinir, almennar lærugreinir og vallærugreinir.

**§ 4.** Býtið millum verkligu læruna og skúlagongdina er skipað soleiðis:
1) verklig læra,
2) 1. skúlaskeið, 20 vikur,
3) verklig læra, uml. 15 vikur,
4) 2. skúlaskeið, 10 vikur,
5) verklig læra, uml. 30 vikur,
6) 3. skúlaskeið, 10 vikur,
7) verklig læra, uml. 30 vikur,
8) 4. skúlaskeið, 10 vikur,
9) verklig læra, uml. 30 vikur,
10) 5. skúlaskeið, 10 vikur,
11) verklig læra, uml. 5 vikur,
12) sveinaroynd, 2 dagar, og
13) verklig læra restina av lærutíðini.

## Kapittul 2
## Innihaldið í útbúgvingini

*Skúlaparturin*

**§ 5.** Samlaða skúlagongdin í hárfríðkaraútbúgvingini er 2400 tímar, av hesum er skemalagda undirvísingartíðin 2160 tímar, samanber § 4, stk. 2 í kunngerð um felags reglur fyri yrkisútbúgvingar.

*Stk. 2.* Skemalagda undirvísingartíðin er lutað sundur sambært § 12, stk. 2 í lógini.

**§ 6.** Skemalagda tímatalið til yrkislærugreinir er tilsamans 1480 tímar við hesum lærugreinum:

| |
|---|
| Hárvask/hárbotnsmassaga, fønturkan, brýr og vippur |
| Klippiteknikkur |
| Friseringsteknikkur |
| Langt hár |
| Fønturkan (føll/bombage) |
| Fakligt ástøði |
| Permanentteknikkur |
| Evnafrøðilig viðgerð |
| Faklig tekning |
| Anatomi/fysiologi |
| Húð- og vakurleikarøkt |
| Stíl, snið og skap |
| Heilsurøkt |
| Fyrstuhjálp |
| Eldsløkking |

*Stk. 2.* Høvuðsevnini í yrkislærugreinunum og tímabýtið verða neyvari lýst í lesiætlan fyri hesar lærugreinir sambært kunngerð nr. 59 frá 14. september 2004 um lesiætlanir fyri yrkislærugreinir.

**§ 7.** Skemalagda tímatalið til almennar lærugreinir er tilsamans 480 tímar við hesum lærugreinum:

| *Almennar lærugreinir eru á E-stigi* | *Tímatal* |
|---|---|
| Føroyskt | 80 |
| Enskt | 80 |
| Søla/tænasta | 80 |
| Virkisbúskapur | 80 |
| Sálarfrøði | 80 |
| Samfelagslæra | 80 |
| *Tímatal tilsamans* | *480* |

**§ 8.** Skemalagda tímatalið til vallærugreinir er tilsamans 200 tímar, og innihaldið verður neyvari lýst í viðkomandi lesiætlan.

*Verkligi parturin*

**§ 9.** Á læruplássinum skal lærlingurin gjøgnumganga og arbeiða við øllum teimum viðkomandi arbeiðsuppgávunum, sum eru á virkinum. Hesar uppgávur verða neyvari lýstar í arbeiðsætlan fyri verkliga partin, ið avvarðandi yrkisnevnd tilevnir og góðkennir.
*Stk. 2.* Upplæring innan tey ymsu arbeiðsøkini verður váttað í eini logbók, sum læruplássið og skúlin hava skyldu til at føra.

**§ 10.** Lærlingurin, skúlin og læruplássið nýta logbókina sambært § 9, stk. 2, í samskiftinum sínámillum, so hvørt sum útbúgvingin líður.

## Kapittul 3
## Eftirmeting áðrenn sveinaroynd

*1. skúlaskeið*

**§ 11.** Eftir 1. skúlaskeið verður hildin roynd í yrkislærugreinum og próvtøka í almennum lærugreinum sambært § 13 í kunngerð um felags reglur fyri yrkisútbúgvingar.
*Stk. 2.* Í almennum lærugreinum, sum Mentamálaráðið tekur út, verður farið til próvtøku tvær ferðir í 1. skúlaskeiði.
*Stk. 3.* Próvtøkurnar í almennum lærugreinum fara fram sambært ásetingum í lesiætlanini fyri einstøku lærugreinina.

*Fylgjandi skúlaskeið*

**§ 12.** Fakliga støðið hjá einstaka lærlinginum skal í øllum fylgjandi skúlaskeiðum eftirmetast sambært § 19 í kunngerð um felags reglur fyri yrkisútbúgvingar.
*Stk. 2.* Í almennum lærugreinum, sum Mentamálaráðið tekur út, verður farið til próvtøku eina ferð í 2. skúlaskeiði og tvær ferðir í 4. skúlaskeiði.

## Kapittul 4
## Sveinaroynd

**§ 13.** Tá ið lærlingurin hevur staðið skúlapartin, og áðrenn lærlingurin hevur lokið verkligu læruna, verður farið til sveinaroynd.
*Stk. 2.* Treytin fyri at verða tikin upp til sveinaroynd er, at lærlingur hevur staðið øll skúlaskeiðini sambært § 11 og §12.
*Stk. 3.* Sveinaroyndin er býtt upp í tveir partar:
1) skrivlig roynd, og
2) verklig roynd.
*Stk. 4.* Tann skrivliga royndin er ein samansett roynd innan yrkislærugreinirnar. Eingir hjálparmiðlar eru loyvdir. Lærlingurin fær 240 minuttir til at svara spurningunum.

**§ 14.** Tær verkligu royndirnar fevna um uppgávur í teimum lærugreinum, sum undirvíst er í á skúlanum og á læruplássinum.
*Stk. 2.* Metingardómararnir avgera, um yrkisgreinirnar verða gjørdar á egnari modell ella á modell við lutakasti. Tá ið sveinaroyndin byrjar, avgera metingardómararnir, um modellirnar verða góðtiknar.
*Stk. 3.* Lærlingurin fær 16 tímar í 2 dagar til verkligu uppgávuna.

**§ 15.** Fyri at standa sveinaroyndina, skal lærlingurin fáa í minsta lagi próvtalið 6 fyri skrivligu próvtøkuna.
*Stk. 2.* Í verkligu próvtøkuni má einki av próvtølunum verða minni enn 6.
*Stk. 3.* Fyri skrivliga partin av sveinaroyndini geva lærarin og metingardómararnir eitt felags próvtal.
*Stk. 4.* Fyri verkliga partin geva metingardómararnir eitt felags próvtal fyri hvørja yrkisgrein.
*Stk. 5.* Endaliga próvtalið av sveinaroyndini er miðaltalið av teimum givnu próvtølunum, rundað til næsta próvtal eftir próvtalsstiganum. Er miðaltalið millum tvey próvtøl, verður rundað til hægra próvtalið.

*Sjúkra- og endurroynd*

**§ 16.** Sjúkra- og endurroynd verður skipað sambært § 6, stk. 2 í kunngerð um próvtøkur í yrkislærugreinum og fremjingarreglur fyri yrkis- og sveinaroyndir.

## Kapittul 5
## Gildiskoma

**§ 17**. Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og er eisini galdandi fyri lærlingar, sum hava byrjað læruna, áðrenn henda kunngerð kemur í gildi.
*Stk. 2.* Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 11 frá 21. februar 2007 um hárfríðkaraútbúgving.

Mentamálaráðið, 23. apríl 2010

**Helena Dam á Neystabø (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Leivur Harryson (sign.)

# Kunngerð um elektrikaraútbúgving

Við heimild í § 4, stk. 1, § 8, stk. 3, § 14, stk. 1 og 2, § 16, stk. 2, § 17, stk. 2, og § 18, stk. 2 í løgtingslóg nr. 94 frá 29. desember 1998 um yrkisútbúgvingar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 15 frá 16. mars 2006, verður ásett:

## Kapittul 1
## Endamál og bygnaður

**§ 1.** Útbúgvingin til elektrikara skal:
1) geva lærlinginum førleika at útinna tað handverk, ið er knýtt at arbeiðinum,
2) leggja grundarlag undir framtíðar yrki og framhaldandi útbúgving,
3) menna tann einstaka og hjálpa viðkomandi til samfelagsliga fatan,
4) geva lærlinginum førleika at samstarva við sínar arbeiðsfelagar og leiðsluna á virkinum,
5) geva lærlinginum førleika at tilrættaleggja arbeiðið á skilagóðan hátt, og
6) geva lærlinginum førleika at seta seg inn í galdandi reglur og lóggávu innan starvsøkið.

*Stk. 2.* Tann útbúni elektrikarin skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og í samsvari við galdandi reglur og lóggávu. Elektrikarin skal kunna finna brek, umvæla, góðskutryggja og halda viðlíka elektriskar skipanir.

*Stk. 3.* Yrkisútbúgvingin hevur tvær sergreinir:
1) ljós- og stýringartøkni, og
2) samskiftis- og tryggingartøkni

*Stk. 4.* Sergreinin verður vald, tá ið lærusáttmáli verður skrivaður við virkið. Virkið skal vera góðkent sum lurupláss í viðkomandi sergrein.

*Stk. 5.* Skúlagongdin í sergreinini ljós- og stýringartøkni fer fram í føroyskum yrkisskúla.

*Stk. 6.* Í sergreinini samskiftis- og tryggingartøkni fer 1. skúlaskeið fram í føroyskum yrkisskúla. Innihaldið í hesum skúlaskeiði er tað sama sum í sergreinini ljós- og stýringartøkni. Írestandi skúlaskeiðini fara fram á donskum yrkisskúla.

**§ 2.** Lærutíðin í sergreinini ljós- og stýringartøkni er 4 ár.

*Stk. 2.* Í sergreinini samskiftis- og tryggingartøkni er lærutíðin sambært longdini á útbúgvingini í Danmark.

**§ 3.** Skúlagongdin í sergreinini ljós- og stýringartøkni er 55 vikur.

*Stk. 2.* Býtið millum verkligu læruna og skúlagongdina er skipað soleiðis:
1) Verklig læra,
2) 1. skúlaskeið, 20 vikur,
3) verklig læra , uml. 30 vikur,
4) 2. skúlaskeið, 10 vikur,
5) verklig læra , uml. 30 vikur,
6) 3. skúlaskeið, 10 vikur,
7) verklig læra , uml. 30 vikur,
8) 4. skúlaskeið, 10 vikur,
9) verklig læra , uml. 30 vikur,
10) 5. skúlaskeið, 5 vikur, og
11) verklig læra restina av lærutíðini.

## Kapittul 2
## Innihaldið í útbúgvingini

*Skúlaparturin*

**§ 4.** Samlaða skúlagongdin í elektrikaraútbúgvingini er 2200 tímar, av hesum er skemalagda undirvísingartíðin 1980 tímar, sbr. 4, stk. 2 í kunngerð um felags reglur fyri yrkisútbúgvingar.

*Stk. 2.* Skemalagda undirvísingartíðin er lutað sundur sbr. § 12, stk. 2 í lógini.

**§ 5.** Skemalagda tímatalið til yrkislærugreinir fyri sergreinina ljós- og stýringartøkni er tilsamans 1320 tímar við hesum lærugreinum:

| *Lærugrein* |
|---|
| Ravmagnslæra |
| Diagramlæra |
| Stýringar |
| Innlegging og elektrotøkni, byrjanarstig |
| Innlegging og tilgerðartøkni, vanastig |
| Innlegging og dimensionering, framkomið stig |
| Elektrotøkni, vanastig |
| Elektrotøkni, framkomið stig |
| Góðskustýring, byrjanarstig |
| Góðskustýring, vanastig |
| Góðskustýring, framkomið stig |
| Stýringartøkni, vanastig |
| Stýringartøkni, framkomið stig |
| Sjálvirkandi skipanir, framkomið stig |
| Vitugar innleggingar, framkomið stig |
| Ljósskipanir, framkomið stig |
| Orkutøkni |

**§ 6.** Høvuðsevnini í yrkislærugreinunum verða neyvari lýst í lesiætlan fyri hesar lærugreinir, sbr. kunngerð um lesiætlanir í yrkislærugreinum.

**§ 7.** Skemalagda tímatalið til almennar lærugreinir fyri sergreinina ljós- og stýringartøkni er tilsamans 460 tímar við hesum lærugreinum:

| *Lærugrein* | *Tímatal* |
|---|---|
| Føroyskt E | 80 |
| Enskt E | 80 |
| Støddfrøði E | 80 |
| Støddfrøði D | 60 |

| | |
|---|---|
| Alisfrøði E | 80 |
| Arbeiðsumhvørvi | 80 |
| *Í alt:* | *460* |

**§ 8.** Skemalagda tímatalið til vallærugreinir er tilsamans 200 tímar, og innihaldið verður neyvari lýst í viðkomandi lesiætlan.

*Verkligi parturin*

**§ 9.** Á læruplássinum skal lærlingurin gjøgnumganga og arbeiða við øllum teimum viðkomandi arbeiðsuppgávunum, sum eru á virkinum. Hesar uppgávur verða neyvari lýstar í arbeiðsætlan fyri verkliga partin, ið avvarðandi yrkisnevnd tilevnir og góðkennir.
*Stk. 2.* Um læruplássið ikki kann geva lærlinginum møguleika at arbeiða við øllum arbeiðsuppgávunum í sergreinini, kann læruplássið gera avtalu við útisetavirki, so at lærlingurin fær upplæring í teimum arbeiðsuppgávum, sum vanta.
*Stk. 3.* Avvarðandi yrkisnevnd skal góðkenna avtalur eftir stk. 2 millum lærupláss og útisetavirki.

## Kapittul 3
## Eftirmeting áðrenn sveinaroynd

*1. skúlaskeið*

**§ 10.** Eftir 1. skúlaskeið verður hildin roynd í yrkislærugreinum og próvtøka í almennum lærugreinum sambært § 13 í kunngerð um felags reglur fyri yrkisútbúgvingar.
*Stk. 2.* Í almennum lærugreinum, sum Mentamálaráðið tekur út, verður farið til próvtøku tríggjar ferðir í 1. skúlaskeiði.
*Stk. 3.* Próvtøkurnar í almennum lærugreinum fara fram sambært ásetingum í lesiætlanini fyri einstøku lærugreinina.

*Fylgjandi skúlaskeið*

**§ 11.** Fakliga støðið hjá einstaka lærlinginum skal í øllum fylgjandi skúlaskeiðum eftirmetast sambært § 19 í kunngerð um felags reglur fyri yrkisútbúgvingar.
*Stk. 2.* Í almennum lærugreinum, sum Mentamálaráðið tekur út, verður farið til próvtøku eina ferð í 2. og eina ferð í 3. skúlaskeiði.

## Kapittul 4

*Sveinaroynd*

**§ 12.** Tá ið lærlingurin hevur staðið skúlapartin, og áðrenn lærlingurin hevur lokið verkligu læruna, verður farið til sveinaroynd.
*Stk. 2.* Treytin fyri at verða tikin upp til sveinaroynd er, at lærlingur hevur staðið øll skúlaskeiðini sambært § 10 og §11.
*Stk. 3.* Sveinaroyndin er býtt upp í tveir partar:
1) skrivlig roynd, og
2) verklig roynd.
*Stk. 4.* Tann skrivliga royndin er ein samansett roynd innan yrkislærugreinirnar. Loyvdir hjálparmiðlar í hesum sambandi eru nýttar lærubøkur, fylgiskjøl og lummaroknari, góðkend av skúlanum. Lærlingurin fær 120 minuttir til at svara spurningunum.
*Stk. 5.* Til verkligu royndina verður ein uppgáva gjørd í sambandi við skúlaundirvísingina og ein munnlig framløga við støði í tí elektrotøkniliga innihaldinum í verkligu uppgávuni.
*Stk. 6.* Tann verkliga uppgávan verður annaðhvørt gjørd einsæris ella í bólki.
*Stk. 7.* Lærlingurin ella bólkurin fær 100 klokkutímar til verkligu uppgávuna og 20 minuttir til framløguna fyri hvønn lærling.

**§ 13.** Fyri skrivliga partin av sveinaroyndini geva lærarin og báðir metingardómararnir í felag eitt próvtal.
*Stk. 2.* Fyri verkliga partin av sveinaroyndini geva lærarin og báðir metingardómararnir í felag próvtal fyri ávikavist útinning av verkligu uppgávuni og munnliga yvirhoyring í elektrotøkniliga innihaldinum í uppgávuni.
*Stk. 3.* Í dømingini av avrikinum verður dentur lagdur á, at lærlingurin vísir hollan kunnleika til fakliga grundarlagið í yrkinum, og at lærlingurin loysir settu uppgávurnar sjálvstøðugt og á ein fullgóðan hátt.
*Stk. 4.* Fyri at standa royndina krevst, at próvtalið fyri skrivligu royndina og miðaltalið av próvtølunum fyri verkligu royndina bæði eru í minsta lagi 6.
*Stk. 5.* Sveinaroyndarpróvtalið er miðaltalið av próvtalinum fyri skrivligu royndina og miðalpróvtalinum fyri verkligu royndina.
*Stk. 6.* Lærlingurin fær upplýst próvtøkuúrslitið frá læraranum og báðum metingardómarunum beint eftir, at royndin er liðug.
*Stk. 7.* Skúlin sendir upplýsingarnar um próvtal lærlingsins, sum er givið eftir stk. 5, til avvarðandi yrkisnevnd.

*Sjúkra- og endurroynd*

**§ 14.** Sjúkra- og endurroynd verður skipað samsvarandi § 6, stk. 2 í kunngerð um próvtøkur í yrkislærugreinum og fremjingarreglur fyri yrkis- og sveinaroyndir.

## Kapittul 5

*Gildiskoma*

**§ 15**. Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og er er eisini galdandi fyri lærlingar, sum hava byrjað læruna, áðrenn kunngerðin kemur í gildi.
*Stk. 2.* Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 1 frá 2. januar 2007 um elektrikaraútbúgving.

Mentamálaráðið, 23. apríl 2010

**Helena Dam á Neystabø (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Leivur Harryson (sign.)

Nr. 26 23. apríl 2010

**Kunngerð**
**um**
**sáttmálaskylduga útbúgving, upptøku í skúla og floksbýtistal**

Við heimild í § 5, stk. 1, 2 og 3 og § 6, stk. 2 í løgtingslóg nr. 94 frá 29. desember 1998 um yrkisútbúgvingar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 15 frá 16. mars 2006, verður ásett:

**§ 1.** Tær yrkisútbúgvingar, ið nevndar eru í fylgiskjali 1 til hesa kunngerð, koma undir sáttmálaskyldu.
*Stk. 2.* Tær yrkisútbúgvingar, ið nevndar eru í fylgiskjali 2 til hesa kunngerð, hevur landsstýrismaðurin stovnsett.
*Stk. 3.* Teir skúlar, ið nevndir eru í fylgiskjali 2, eru góðkendir at hava undirvísing í teimum yrkisútbúgvingum, sum teir í sama fylgiskjali eru knýttir at.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin hevur umsjón við, at fyrisitingarligu viðurskiftini við atliti at góðkenning eftir stk. 2 er í lagi og í samsvari við fakliga og námsfrøðiliga førleikan, ið krevst.

**§ 2**. Landsstýrismaðurin setir býtisnevnd, sum skal gera tilmæli um
1) upptøku av lærlingum til yrkisútbúgvingar
2) býti av flokkum millum skúlar
3) nær upptøka fer fram.

*Stk. 2.* Nevndin er sett saman soleiðis:
1) skúlastjórarnir, sum vara av yrkisskúlum, ið hava undirvísing innan somu útbúgvingar
2) umboð fyri Yrkisdepilin
3) umboð fyri Mentamálaráðið, sum er formaður.

**§ 3.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 60 frá 13. mai 2002 um sáttmálaskylduga útbúgving, upptøku í skúla, floksbýtistal og skúlasamstarv.

Mentamálaráðið, tann 23. apríl 2010

**Helena Dam á Neystabø, (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Leivur Harryson, (sign.)

**Fylgiskjal 1**

**Mai 2002**

Samsvarandi § 1, stk. 1 í hesi kunngerð, koma hesar yrkisútbúgvingar undir sáttmálaskyldu:

| **Byggiyrkið:** |
|---|
| Byggismiður |
| Bygningsmálari |
| Bygningssnikkari |
| Gartnari |
| Glarsmiður |
| Gólváleggjari |
| Gróthøggari |
| Maskinsnikkari |
| Múrari |
| Møbilsnikkari |
| Skipssnikkari |
| Timburmaður |
| Træskipasmiður |
| Urgubyggjari |

| **Flutningsyrkið:** |
|---|
| Bilelektromekanikari |
| Bilmálari |
| Bilplátusmiður |
| Bilsmiður |
| Entreprenørmaskinumekanikari |
| Flogmekanikari |
| Lastbilamekanikari |
| Súkklu- /motorsúkklumekanikari |
| **Grafiska- og miðlayrkið** |
| Fotografur |
| Grafiskur tøkningur |
| Miðlagrafikari |
| Skeltimálari |

| **El- og samskiftisyrkið:** |
|---|
| Automatiktøkningur (Automatikmekanikari) |
| Datamekanikari |
| Elektrikari |
| Elektroniktøkningur (Elektronikmekanikari) |
| Elektrotøkningur (Elektromekanikari) |
| IT-supportari (KT-stuðul) |
| Miðlatøkningur (Miðlatøknimekanikari) |
| Miðlaatstøðari (AV-atstøðari) |
| Radio- og sjónvarpstøkningur (Radiomekanikari) |

| **Handils- og skrivstovuyrkið:** |
|---|
| **Handil – smásøla** |
| Grein: |
| - blómuprýði |
| - dekoratør |
| - søluatstøðari |
| - søluatstøðari v/sergrein |
| **Handil - heilsøla** |
| Grein: |
| - handilsatstøðari, søla |
| - handilsatstøðari, tænasta |
| - innkeypsatstøðari |
| - logistikkatstøðari |
| **Skrivstova** |
| Grein: |
| - advokatskrivari |
| - almenn fyrisiting |
| - búskapur |
| - ferðavinna |
| - fyrisiting |
| - grannskoðan |
| - KT-fyrisiting |
| - læknaskrivari |
| - speditión/shipping |

| **Fiskaídnaðar-, land- og havbúnaðaryrkið:** |
|---|
| Alari |
| Fiskavirkari |
| Fiskireiðsskapstøkningur |
| Landbúnaðartøkningur |

| **Matvøruyrkið:** |
| --- |
| Bakari |
| Kokkur |
| Konditari |
| Køksatstøðari |
| Matstovuatstøðari |
| Meiaristur |
| Reseptiónistur |
| Slaktari |
| Tænari |
| Viðskerafrúgv |

| **Metallyrkið:** |
| --- |
| Edilmálmasmiður (Gullsmiður) |
| HVS-smiður / montørur |
| Ídnaðartøkningur |
| Kølitøkningur |
| Maskinsmiður |
| Metallsmiður |
| Plastbátasmiður |
| Plátu- og konstruktiónssmiður |
| Rustfastur kleinsmiður |
| Rørsmiður |
| Seglmakari |
| Stálskipasmiður |

| **Tænastu- og tilvirkisyrkið:** |
| --- |
| Hárfríðkari |
| Klædnavirkari |
| Kosmetikari |
| Optikari |
| Ortopædistur |
| Skósmiður |
| Skorsteinssópari |
| Tannklinikkatstøðari |
| Tanntøkningur |
| Ursmiður |
| Veterinærheilsurøktari |

**Fylgiskjal 2**

**Mai 2002**

Samsvarandi § 1, stk. 2 í hesi kunngerð, eru nevndu skúlar góðkendir at hava undirvísing í teimum í fylgiskjali 1 nevndu útbúgvingunum, sum koma undir sáttmálaskyldu, sbr. tó § 2:

| **Yrki** | **Skúlar** |
|---|---|
| **Byggiyrkið:** | |
| - Bygningssnikkari | Teknisku skúlarnir |
| - Timburmaður | Teknisku skúlarnir |
| | |
| **El- og samskiftisyrkið:** | |
| - Elektrikari | Teknisku skúlarnir |
| | |
| **Fiskaídnaðar-, land- og havbúnaðaryrkið:** | |
| - Alari | Fiskivinnuskúlin |
| - Fiskavirkari | Fiskivinnuskúlin |
| - Fiskireiðsskapstøkningur | Fiskivinnuskúlin |
| - Landbúnaðartøkningur | Fiskivinnuskúlin |
| | |
| **Flutningsyrkið:** | |
| - Bilsmiður | Teknisku skúlarnir |
| | |
| **Handils- og skrivstovuyrkið** | |
| - søluatstøðari | Føroya Handilsskúli |
| - logistikkatstøðari | Føroya Handilsskúli |
| - fyrisiting | Føroya Handilsskúli |
| - KT-fyrisiting | Føroya Handilsskúli |
| | |
| **Metallyrkið** | |
| - Maskinsmiður | Teknisku skúlarnir |
| - Metallsmiður | Teknisku skúlarnir |
| - Plátu- og konstruktiónssmiður | Teknisku skúlarnir |
| - Rustfastur kleinsmiður | Teknisku skúlarnir |
| - Rørsmiður | Teknisku skúlarnir |
| - Stálskipasmiður | Teknisku skúlarnir |
| | |
| **Tænastu- og tilvirkisyrkið** | |
| - Hárfríðkari | Teknisku skúlarnir |

Harumframt eru skúlarnir góðkendir at hava undirvísing í ávísum skúlaskeiðum í hesum útbúgvingum, sbr. tó § 2:

| **Yrki** | **Skúlar** | **Skúlaskeið** |
|---|---|---|
| **Byggiyrkið:** | | |
| - Maskinsnikkari | Teknisku skúlarnir | 1. |
| - Møbilsnikkari | Teknisku skúlarnir | 1. |
| - Skipssnikkari | Teknisku skúlarnir | 1. |
| - Træskipasmiður | Teknisku skúlarnir | 1. |
| | | |
| **El- og samskiftisyrkið:** | | |
| - Automatiktøkningur (Automatikmekanikari) | Teknisku skúlarnir | 1. |
| - Datamekanikari | Teknisku skúlarnir | 1. |
| - Elektroniktøkningur (Elektronikmekanikari) | Teknisku skúlarnir | 1. |
| - Elektrotøkningur (Elektromekanikari) | Teknisku skúlarnir | 1. |
| - Radio- og sjónvarpstøkningur (Radiomekanikari) | Teknisku skúlarnir | 1. |
| | | |
| **Flutningsyrkið:** | | |
| - Bilelektromekanikari | Teknisku skúlarnir | 1. |
| - Bilplátusmiður | Teknisku skúlarnir | 1. |
| - Entreprenørmaskinumekanikari | Teknisku skúlarnir | 1. |
| - Lastbilamekanikari | Teknisku skúlarnir | 1. |
| - Súkklu- /motorsúkklumekanikari | Teknisku skúlarnir | 1. |
| | | |
| **Metallyrkið** | | |
| - Plátu og konstruktiónssmiður | Teknisku skúlarnir | 1. og 2. |
| - Rustfastur kleinsmiður | Teknisku skúlarnir | 1., 2., 3. og 4. |

Nr. 27 23. apríl 2010

# Kunngerð um felags reglur fyri yrkisútbúgvingar

Við heimild í § 4, stk. 1, § 8, stk. 3, § 14, stk. 1 og 2, § 16, stk. 2, § 17, stk. 2, § 18, stk. 1 og 2 og § 46 í løgtingslóg nr. 94 frá 29. desember 1998 um yrkisútbúgvingar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 15 frá 16. mars 2006, verður ásett:

## Kapittul 1
## Útbúgvingarreglur

**§ 1.** Fyri yrkisútbúgvingar, sum landsstýrismaðurin hevur góðkent, skulu yrkisnevndirnar samtykkja:
1) útbúgvingartíð og býti millum verkliga læru og skúlagongd,
2) stevnumið fyri verkliga læru og skúlagongd,
3) hvørjar yrkislærugreinir eru partur av útbúgvingunum, og
4) reglur um døming við atliti at yrkislærugreinum og stevnumiðum fyri møguligari yrkis- ella sveinaroynd.

**§ 2.** Valið av lærugreinum skal taka atlit at viðkomandi yrkisøki og saman við undirvísingini tryggja:
1) fakliga dygd og breidd, so lærlingarnir fáa kunnleika til tilfar, arbeiðsgongdir, tænastuveiting, dygdartilvitan, umhvørvi, mál, náttúruvísind, fyrisiting og vinnubygnað,
2) persónliga menning, so lærlingarnir gerast førir fyri at ogna sær nýggja vitan, fáa sjálvsálit, gerast sjálvbjargnir og menna skapanar-, samstarvs-, samskiftis- og greiningarevni,
3) lestrarførleikan við atliti at framhaldandi útbúgving, og
4) fatanina av samfelagnum og tess menning innan ymisk øki, eins og innlit í viðurskifti í øðrum londum og mentanum teirra.

## Kapittul 2
## Útbúgvingarbygnaður

**§ 3.** Yrkisútbúgvingarnar eru settar saman av verkligari læru á læruplássi og skúlagongd á góðkendum yrkisskúla.

*Útbúgvingartíð*

**§ 4.** Samlaða útbúgvingartíðin og býtið millum verkliga læru og skúlagongd skal verða ásett í útbúgvingarkunngerðini.
*Stk. 2.* Skúlagongdin hjá lærlingunum svarar til starvstíðina hjá fulltíðarsettum á arbeiðsmarknaðinum. Skemalagda undirvísingarvirksemið fevnir í mesta lagi um 36 pultstímar um vikuna.

*Innihaldið í útbúgvingunum*

**§ 5.** Í útbúgvingarkunngerðini skal endamálið við útbúgvingini verða lýst eins og endamálið við ávikavist yrkislærugreinum, almennum lærugreinum og vallærugreinum.
*Stk. 2.* Býtið millum yrkislærugreinir, almennar lærugreinir og vallærugreinir skal vanliga verða ávikavist seks tíggjundapartar, tríggir tíggjundapartar og ein tíggjundapartur av samlaðu tíðini.
*Stk. 3.* Almennar lærugreinir kunnu í serligum føri verða havdar ístaðin fyri yrkislærugreinir.
*Stk. 4.* Yrkislærugreinir kunnu í serligum føri verða havdar ístaðin fyri vallærugreinir.
*Stk. 5.* Í einstøku útbúgvingarkunngerðini skal tímatalið í almennum lærugreinum ásetast fyri hvørja lærugrein sær og tilsamans. Í yrkislærugreinum og vallærugreinum skal tímatalið ásetast við vegleiðandi tímatali tilsamans.
*Stk. 6.* Almennar lærugreinir skulu liggja so tíðliga sum møguligt í útbúgvingini. Mentamálaráðið ger lesiætlanir fyri almennu lærugreinirnar.
*Stk. 7.* Viðkomandi yrkisnevnd ger lesiætlanir fyri einstøku yrkislærugreinirnar sambært kunngerð nr. 59 frá 14. september 2004 um lesiætlanir í yrkislærugreinum.

**§ 6.** Innihaldið í yrkislærugreinunum skal við atliti at viðkomandi yrkisøki fevna um:
1) Tøknilig, náttúrufaklig, fyrisitingarlig og vinnubúskaparlig evni, sum bæði eru verklig og ástøðilig við tilknýti til vanligar arbeiðsuppgávur, arbeiðshættir, maskinur, útbúnað, amboð, tilfar, fyrisiting og fyriskipanir,
2) evni, sum viðvíkja formgeving og dygdartilvitan,
3) yrkiskunnleika í tøkniligum, vinnubúskaparligum, samfelagsligum og søguligum høpi,
4) evni, sum lýsa sambandið millum vøkstur og menning í einum virki, umframt ta fyriskipanarligu, fíggjarligu, tøknifrøðiligu og tænastuveitingarligu menningina,
5) evni, sum viðgera arbeiðsviðurskifti innan yrkisøkið, eitt nú umhvørvis- og trygdarviðurskifti,
6) leitan og nýtslu av vitan og samskifti á føroyskum og einum ella fleiri fremmandamálum,
7) evni, har arbeitt verður við uppgávum, sum krevja støddfrøðiligar og líknandi arbeiðshættir, og
8) evni av samfelagsligum, sosialum og mentanarligum slagi, eitt nú samfelagsbúskapi, arbeiðsmarknaðarviðurskifti og mentanarsøgu.

**§ 7.** Einstaka útbúgvingarkunngerðin skal fevna um málini fyri verkligu læruna, og við støði í hesum lýsa arbeiðsøkið og arbeiðshættirnar í verkligu læruni. Hesar ásetingar skulu tryggja:

1) at skúlaundirvísingin og verkliga læran styðja hvørja aðra og eru ein heild, og
2) at læruplássini leggja til rættis verkligu læruna í einari hóskandi tíðargongd.

## Kapittul 3
## Eftirmeting áðrenn yrkis- ella sveinaroynd

**§ 8.** Einstaka útbúgvingarkunngerðin skal hava eina eftirmetingarætlan fyri alla útbúgvingina.
*Stk. 2.* Fakliga støðið hjá einstaka lærlinginum skal eftirmetast eftir hvørt skúlaskeið, so lærlingar og lærarar fáa at vita úrslitið av undirvísingini.
*Stk. 3.* Eftirmeting verður framd sum roynd, próvtøka og innanhýsis eftirmeting.
*Stk. 4.* Fyri lærugreinir við minni enn 30 undirvísingartímum í einstaka skúlaskeiðinum verður givin ein luttøkuváttan.
*Stk. 5.* Eftirmetingarskjøl við støðumetum verða undirskrivað av læraranum og latin skúlastjóranum.
*Stk. 6.* Skúlastjórin hevur ábyrgd av, at próvtøl og støðumet verða skrásett í próvtalsbók.
*Stk. 7.* Skúlin skal varðveita eftirmetingarskjøl og próvtalsbøkur í minsta lagi 5 ár.

**§ 9.** Sambært kunngerð nr. 59 frá 13. mai 1997 um próvtalsstiga og aðra døming (próvtalskunngerðin), verður 13-próvtalsstigin nýttur í sambandi við eftirmeting, roynd og próvtøku.

**§ 10.** Viðvíkjandi eftirmeting í einari støðisútbúgving ella øðrum útbúgvingum, sum kunnu geva frítøku fyri skúlaundirvísingini ella stytting av lærutíðini, eru ásetingarnar um eftirmeting í viðkomandi útbúgvingarkunngerðum galdandi.

**§ 11.** Við støði í staðfesta tørvinum skal skúli í samstarvi við lærupláss gera eina ætlan fyri teir lærlingar, sum ikki lúka krøvini sambært § 16, stk.1, § 17, stk. 2, § 18, stk. 2 og § 22, stk. 1.

*1. skúlaskeið*
*Tøkniligar yrkisútbúgvingar*

**§ 12.** 1. skúlaskeið innan tøkniligu yrkisútbúgvingarnar byrjar vanliga í august mánaði og í januar mánaði.
*Stk. 2.* Sambært § 2 í kunngerð um sáttmálaskylduga útbúgving, upptøku í skúla, floksbýtistal og skúlasamstarv ger býtisnevndin av, nær upptøka fer fram.

**§ 13.** Áðrenn 1. skúlaskeið er lokið, verður hildin roynd í yrkislærugreinum og próvtøka í almennum lærugreinum, samanber § 14, § 15 og § 16.

**§ 14.** Royndin í yrkislærugreinum er býtt upp í tveir partar, eina skrivliga og eina verkliga roynd. Bæði tann skrivliga og tann verkliga royndin eru samansettar royndir í teimum yrkislærugreinum, sum undirvíst er í á skúlaskeiðnum.
*Stk. 2.* Til skrivligu royndina fær lærlingurin 120 minuttir til at svara royndarspurningunum.
*Stk. 3.* Til verkligu royndina verður ein uppgáva gjørd í sambandi við skúlaundirvísingina og ein munnlig framløga við støði í innihaldinum í verkligu uppgávuni.
*Stk. 4.* Til verkligu royndina fær lærlingurin 20 minuttir til framløguna.
*Stk. 5.* Loyvdir hjálparmiðlar eru viðkomandi lærubøkur og frálærutilfar, sum er nýtt í undirvísingini, og lummaroknari, ið skúlin hevur góðkent.
*Stk. 6.* Givið verður eitt próvtal fyri ta skrivligu royndina, og eitt próvtal fyri ta verkligu royndina.
*Stk. 7.* Yrkisnevndafyrisitingin tilnevnir ein metingardómara til royndina í yrkislærugreinunum.
*Stk. 8.* Skúlin ger uppgávurnar til royndina í yrkislærugreinunum.

**§ 15.** Mentamálaráðið tekur út almennar lærugreinir til próvtøkur.
*Stk. 2.* Próvtøkurnar fara fram sambært ásetingum í viðkomandi útbúgvingarkunngerðum.
*Stk. 3.* Í teimum lærugreinum, sum Mentamálaráðið ikki tekur út til próvtøku, verður givið støðumet.
*Stk. 4.* Skúlin skal í seinasta lagi 2 vikur eftir, at skúlaskeiðið er byrjað, boða Mentamálaráðnum frá, hvørjir lærlingar skulu til próvtøku eftir lokið skúlaskeið, og hvørjar lærugreinirnar eru.
*Stk. 5.* Skúlin letur inn upplýsingarnar á oyðublað, ið Mentamálaráðið ger.
*Stk. 6.* Skúlin skal alt fyri eitt boða Mentamálaráðnum frá møguligum broytingum.

**§ 16.** Treytin fyri, at lærlingur kann halda fram á 2. Skúlaskeiði, er:
1) at miðaltalið fyri skrivligu og verkligu yrkisroyndina í minsta lagi er 6. Tó má einki próvtal verða minni enn 5
2) at miðaltalið fyri próvtøl og støðumet í almennum lærugreinum og vallærugreinum er í minsta lagi 6.

*Stk. 2.* Dømingin skal vera avgjørd og ikki lutfalslig.

*1. skúlaskeið*
*Fyrisitingar-, handils- og skrivstovuútbúgvingar*

**§ 17.** Í fyrisitingar-, handils- og skrivstovuútbúgvingunum er 1. skúlaskeið svarandi til ásetingar í kunngerð um støðisútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið.
*Stk. 2.* Próvtøka eftir 1. skúlaskeið verður hildin sambært kunngerð um próvtøku í grundútbúgvingini innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuyrkið (FHS) og innan hægri handilspróvtøku (HH).

*1. skúlaskeið*
*Fiskivinnu- og landbúnaðarútbúgvingar*

**§ 18.** Í fiskivinnu- og landbúnaðarútbúgvingum er 1. skúlaskeið svarandi til ásetingar í kunngerð um støðisútbúgving og hægri próvtøku innan fiskivinnu.
*Stk. 2.* Próvtøka eftir 1. skúlaskeið verður hildin sambært kunngerð um próvtøku í støðisútbúgving innan fiskivinnu (SIF) og hægri próvtøku innan fiskivinnu (HIF).

*Fylgjandi skúlaskeið*

**§ 19.** Í øllum fylgjandi skúlaskeiðum verður fakliga støðið hjá einstaka lærlinginum eftirmett, sbr. §§ 20, 21 og 22.

**§ 20.** Í yrkislærugreinunum verður fakliga støðið eftirmett við støðumetum. Talan er um meting lærarans um støðu lærlingsins, tá skúlaskeiðið endar.

**§ 21.** Í almennum lærugreinum og vallærugreinum verður fakliga støðið eftirmett við støðumetum og próvtøkum, sambært ásetingunum í kunngerðum fyri einstøku útbúgvingina.
*Stk. 2.* Í teimum lærugreinum, sum Mentamálaráðið ikki tekur út til próvtøku, verður givið støðumet.

**§ 22.** Treytin fyri, at lærlingur kann halda fram á næsta skúlaskeiði, er:

1) at miðaltalið av støðumetum í yrkislærugreinum er í minsta lagi 6. Tó má einki próvtal verða minni enn 5.
2) at miðaltalið fyri próvtøl og støðumet í almennum lærugreinum og vallærugreinum er í minsta lagi 6.

*Stk.2.* Dømingin skal vera avgjørd og ikki lutfalslig.

*Skúlaummæli*

**§ 23.** Í seinasta lagi 14 dagar eftir lokið skúlaskeið, letur skúlin lærlinginum og viðkomandi læruplássi eitt ummæli við øllum próvtølum og støðumetum, samanber § 16, stk. 1 og § 22, stk. 1.
*Stk. 2.* Skúlaummælið skal ikki hava aðrar metingar ella útsagnir um lærlingin enn tær, sum nevndar eru í stk. 1.

## Kapittul 4
## Yrkis- og sveinaroynd

**§ 24.** Reglur fyri møguligari yrkis- ella sveinaroynd, sum er partur av eftirmetingarætlanini í útbúgvingarkunngerðini, skulu fevna um:

1) upptøku til yrkis- ella sveinaroynd,
2) uppgávusløg í yrkis- ella sveinaroyndum, og
3) døming, her í millum reglur um próvtalsgeving

*Stk. 2.* Fyri at lærlingur kann taka yrkis- ella sveinaroynd, skal hann frammanundan hava lokið krøvini sambært § 16, stk. 1, § 17, stk. 2 § 18, stk. 2 og § 22, stk. 1.
*Stk. 3.* Sveinaroyndin fer fram sambært kunngerð nr. 64 frá 31. mai 2002 um próvtøkur í yrkislærugreinum og fremjingarreglur fyri yrkis- og sveinaroyndir.

**§ 25.** Í sambandi við yrkis- ella sveinaroynd verður 13-próvtalsstigin nýttur sambært kunngerð um próvtalsstiga og aðra døming (próvtalskunngerðin).

**§ 26.** Um miðalpróvtal verður givið við støði í einum ella fleiri lutapróvtølum, skal í einstøku útbúgvingarkunngerðini vera reglur um útrokning av miðalpróvtali, her í millum hvussu próvtøl verða avrundað.
*Stk. 2.* Tann endaliga dømingin av royndini skal einans lýsast við próvtali.
*Stk. 3.* Dømingin skal vera avgjørd og ikki lutfalslig.

*Skúlaváttan*

**§ 27.** Eftir seinasta skúlaskeið letur skúlin lærlinginum skúlaváttan. Í skúlaváttanini skulu standa tær sergreinir, sum lærlingurin hevur tikið, umframt øll próvtøl í sambandi við yrkis- ella sveinaroyndina.
*Stk. 2.* Aðrar metingar ella útsagnir mugu ikki setast í skúlaváttanina.
*Stk. 3.* Mentamálaráðið ger oyðubløðini til skúlaváttanirnar.
*Stk. 4.* Avrit av skúlaváttanini skal latast til viðkomandi lærupláss og til Yrkisdepilin.
*Stk. 5.* Skúlaváttan kann bert gevast lærlingi, sum hevur staðið yrkis- ella sveinaroynd sambært reglunum í einstøku útbúgvingarkunngerðini.
*Stk. 6.* Gevst lærlingur áðrenn fullførda útbúgving, skal skúlin lata lærlinginum eina váttan fyri tann partin av skúlagongdini, hann hevur luttikið í.

*Starvsváttan*

**§ 28.** Eftir lokna læru skal viðkomandi lærupláss geva lærlingi eina starvsváttan um verkliga partin. Um so er, at fleiri virki eru partar av lærusáttmálanum, gevur hvørt virki sær eina starvsváttan.
*Stk. 2.* Avrit av starvsváttanini skal latast til Yrkisdepilin.
*Stk. 3.* Starvsváttanin skal fevna um:

1) heitið á útbúgvingini, umframt heitið á møguligari sergrein ella yrki,
2) navnið á virkinum,
3) navnið á útisetavirki, og nær lærlingurin hevur verið har,
4) váttan um, at verkliga læran er framd samsvarandi galdandi reglum,
5) undirskrift virkisleiðarans, og
6) navn og føðingardagur lærlingsins.

*Stk. 4.* Yrkisdepilin ger oyðubløðini til starvsváttanirnar.
*Stk. 5.* Ein starvsváttan kann eftir samtykt frá viðkomandi yrkisnevnd fevna um aðrar, enn tær í stk. 3 nevndu upplýsingar, tá ið tað snýr seg um upptøku til yrkis- ella sveinaroynd.
*Stk. 6.* Starvsváttanin skal ikki hava metandi útsagnir um lærlingin.
*Stk. 7.* Gevst lærlingur áðrenn fullførda útbúgving, skal læruplássi lata lærlinginum eina váttan fyri tann partin av verkligu læruni, hann hevur luttikið í.

*Læru- ella sveinabræv*

**§ 29.** Tá ið lærlingur hevur lokið skúlagongdina og verkligu læruna, verður læru- ella sveinabræv útskrivað við støði í skúlaváttanini sambært § 27, og starvsváttanini sambært § 28.

*Stk. 2.* Yrkisdepilin skrivar út læru- ella sveinabrævið.
*Stk. 3.* Í útbúgving, sum einans hevur skúlagongd, er skúlaváttanin at rokna sum læru- ella sveinabræv.

**§ 30.** Læru- ella sveinabrævið skal fevna um:
1) heitið á útbúgvingini, umframt heitið á møguligari sergrein ella yrki,
2) heimild fyri útbúgvingini,
3) tilvísing til hjáløgdu skúlaváttan,
4) tilvísing til hjáløgdu starvsváttan,
5) navnið á tí, ið hevur skrivað læru- ella sveinabrævið, og
6) navn og føðingardagur lærlingsins.

*Stk. 2.* Læru- ella sveinabrævið skal ikki hava metandi útsagnir um lærlingin.

## Kapittul 5
## Kærur

**§ 31.** Kæra um avgerð skúlastjórans í námsfrøðiligum máli ella kæra um avgerð, tikin í sambandi við próvtøku, her í millum um áseting av próvtali, kann leggjast fyri landsstýrismannin.
*Stk. 2.* Um lærlingur ikki er myndugur, verður avgerð skúlastjórans eisini send tí, sum hevur foreldramyndugleikan.
*Stk. 3.* Kæra í námsfrøðiligum máli verður skrivliga latin skúlastjóranum innan 7 dagar eftir, at avgerðin er kunngjørd lærlinginum. Skúlastjórin ummælir kæruna og gevur tí, ið kærir, møguleika fyri innan 7 dagar at gera viðmerkingar til ummæli skúlastjórans. Málið verður sent landsstýrismanninum saman við ummæli skúlastjórans og møguligum viðmerkingum frá kærara.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ger av, um avgerð skúlastjórans skal standa við, ella um avgerðin skal broytast til frama fyri tann, sum kært hevur.

## Kapittul 6
## Aðrar ásetingar

**§ 32.** Um skúlagongdin í ávísari yrkisútbúgving ikki fer fram á føroyskum skúla, verður skúlaparturin í útbúgvingini skipaður eftir teimum reglum, ið eru galdandi í viðkomandi landi.

## Kapittul 7
## Gildiskoma

**§ 33.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og er eisini galdandi fyri lærlingar, sum byrjað hava læruna, áðrenn henda kunngerð kemur í gildi.
*Stk. 2.* Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 119 frá 20. desember 2006 um felags útbúgvingarreglur og útbúgvingarbygnað fyri yrkisútbúgvingar.

Mentamálaráðið, tann 23. apríl 2010

**Helena Dam á Neystabø (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Leivur Harryson (sign.)

Nr. 28 23. apríl 2010

# Kunngerð um bilsmiðútbúgving

Við heimild í § 4, stk. 1, § 8, stk. 3, § 14, stk. 1 og 2, § 16, stk. 2, § 17, stk. 2 og § 18, stk. 2 í løgtingslóg nr. 94 frá 29. desember 1998 um yrkisútbúgvingar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 15 frá 16. mars 2006, verður ásett:

## Kapittul 1
## Endamál og bygnaður

**§ 1.** Útbúni bilsmiðurin skal verða førur fyri:
1) at leggja til rættis og fremja eina skynsama arbeiðsgongd í sambandi við eftirlit,
2) at finna brek í bensin- og dieselriknum akførum og kunna umvæla ella skifta út slitnar lutir eftir tørvi,
3) at meta um umvælingarmøguleikar og leiðbeina um ta ódýrastu umvælingina við atliti at tí, ið kundin ynskir viðvíkjandi rakstrarkostnaði, ferðslutrygd, útsjónd á akfarinum, brúksvirði og umhvørviskrøvum, og
4) at nýta umvælingarhandbøkur á norðurlendskum ella øðrum fremmanda máli og aðrar atkomuligar upplýsingar, t.d. myndugleikafyriskipanir fyri motorakfør.

*Stk. 2.* Arbeiðið skal verða gjørt í samsvari við galdandi ferðslulóg, trygdarreglur og umhvørviskrøv.

**§ 2.** Lærutíðin í yrkisútbúgvingini bilsmiður er 4 ár.

**§ 3.** Skúlagongdin er 55 vikur.
*Stk. 2.* Skúlagongdin er sett saman av 1. skúlaskeiði á 20 vikur og 7 eftirfylgjandi skúlaskeiðum á 5 vikur hvørt.

**§ 4.** Býtið millum verkligu læruna og skúlagongdina er skipað soleiðis:
1) verklig læra,
2) 1. skúlaskeið, 20 vikur,
3) verklig læra, uml. 20 vikur,
4) 2. skúlaskeið, 5 vikur,
5) verklig læra, uml. 20 vikur,
6) 3. skúlaskeið, 5 vikur,
7) verklig læra, uml. 20 vikur,
8) 4. skúlaskeið, 5 vikur,
9) verklig læra, uml. 20 vikur,
10) 5. skúlaskeið, 5 vikur,
11) verklig læra, uml. 20 vikur,
12) 6. skúlaskeið, 5 vikur,
13) verklig læra, uml. 20 vikur,
14) 7. skúlaskeið, 5 vikur,
15) verklig læra, uml. 20 vikur,
16) 8. skúlaskeið, 5 vikur, og
17) verklig læra restina av tíðini.

## Kapittul 2
## Innihaldið í útbúgvingini

*Skúlaparturin*

**§ 5.** Samlaða skúlagongdin í bilsmiðútbúgvingini er 2200 tímar, av hesum er skemalagda undirvísingartíðin 1980 tímar, samanber § 4, stk. 2 í kunngerð um felags reglur fyri yrkisútbúgvingar.
*Stk. 2.* Skemalagda undirvísingartíðin er lutað sundur sambært § 12, stk. 2 í lógini.

**§ 6.** Yrkislærugreinirnar fevna um verkliga og ástøðiliga undirvísing, ið sermerkja viðkomandi útbúgving, og skulu veita almennan kunnleika og fakligan yrkisførleika.
*Stk. 2.* Skemalagda tímatalið til yrkislærugreinir er tilsamans 1300 tímar við hesum lærugreinum:

| |
|---|
| Bensin- og dieselmotorar, byrjanarstig |
| Bensin- og dieselmotorar, vanastig |
| El-skipanir, byrjanarstig |
| El-skipanir, vanastig |
| El-skipanir, framkomið stig |
| Bensinmotorar, framkomið stig |
| Dieselmotorar, framkomið stig |
| Motorstýringar, framkomið stig |
| Skrokkur |
| Stýrigreiðir og avfjarðing |
| Bremsur |
| Transmissión |
| Fyrstahjálp og brand |
| Valfríar yrkislærugreinir |

*Stk. 3.* Høvuðsevnini í yrkislærugreinunum og tímabýtið verða neyvari lýst í lesiætlan fyri hesar lærugreinir sambært kunngerð nr. 59 frá 14. september 2004 um lesiætlanir fyri yrkislærugreinir.

**§ 7.** Almennu lærugreinirnar skulu geva útbúgvingini fakliga breidd og menna lestrarførleika lærlingsins.
*Stk. 2.* Skemalagda tímatalið til almennar lærugreinir er tilsamans 480 tímar við hesum lærugreinum:

| *Lærugrein* | *Tímatal* |
|---|---|
| Føroyskt E | 80 |
| Enskt E | 80 |
| Støddfrøði E | 80 |
| Náttúrulæra E | 80 |
| Umhvørvi E | 80 |
| Samfelagslæra E | 80 |
| *Í alt:* | *480* |

**§ 8.** Vallærugreinirnar skulu stimbra áhugan hjá lærlinginum fyri framhaldandi útbúgving og menna yrkis- og lestrarførleikan.
*Stk. 2.* Skemalagda tímatalið til vallærugreinir er tilsamans 200 tímar, og innihaldið verður neyvari lýst í viðkomandi lesiætlan.

*Verkligi parturin*

**§ 9.** Á læruplássinum skal lærlingurin gjøgnumganga og arbeiða við øllum teimum viðkomandi arbeiðsuppgávunum, sum eru á virkinum. Hesar uppgávur verða neyvari lýstar í arbeiðsætlan fyri verkliga partin, ið avvarðandi yrkisnevnd tilevnir og góðkennir.
*Stk. 2.* Verkligi parturin hevur til endamáls, at lærlingurin:
1) á framkomnum stigi skal kunna finna brek, stilla, viðlíkahalda, royndarkoyra og umvæla bensin- og dieselrikin akfør við at nýta hóskandi amboð og serliga royndar- og mátiútgerð,
2) sýnir lýtaleysa og trygga framferð, tá ið hann fæst við amboð, tilfar og aðra útgerð,
3) á framkomnum stigi skal kunna leggja til rættis sína egnu arbeiðsgongd og leita fram, lesa og skilja faklig viðkomandi skjøl, og
4) í dagliga yrki sínum skal kunna sýna sjálvstøðugt avrik í uppgávugreiðsluni.

*Stk. 3.* Verkligi parturin skal leggjast soleiðis til rættis, at lærlingurin fær venjing og framhaldandi mennir seg bæði innan almenn og faklig vinnulig førleikaøki. Verkligi parturin fevnir um hesi arbeiðs- og virkisøki:
1) at finna brek, stilling, viðlíkahald, royndarkoyra og umvæla akfør undir 3.500 kg,
2) at nýta tøkniligar upplýsingar í yrkinum á norðurlendskum og øðrum fremmanda máli, og
3) vanliga kundatænastu.

**§ 10.** Lærlingurin skal, áðrenn hann tekur sveinaroynd, hava tikið koyrikort til akfar undir 3.500 kg (bólkur B).
*Stk. 2.* Yrkisnevndin kann í serligum føri víkja frá kravinum í stk. 1.
*Stk. 3.* Lærlingurin skal byrja koyrifrálæruna, tá ið útbúgvingin byrjar, ella so skjótt hann er fyltur 18 ár.

## Kapittul 3
## Eftirmeting áðrenn sveinaroynd

*1. skúlaskeið*

**§ 11.** Eftir 1. skúlaskeið verður hildin roynd í yrkislærugreinum og próvtøka í almennum lærugreinum sambært § 13 í kunngerð um felags reglur fyri yrkisútbúgvingar.
*Stk. 2.* Í almennum lærugreinum, sum Mentamálaráðið tekur út, verður farið til próvtøku tríggjar ferðir í 1. skúlaskeiði.
*Stk. 3.* Próvtøkurnar í almennum lærugreinum fara fram sambært ásetingum í lesiætlanini fyri einstøku lærugreinina.

*Fylgjandi skúlaskeið*

**§ 12.** Fakliga støðið hjá einstaka lærlinginum skal í øllum fylgjandi skúlaskeiðum eftirmetast sambært § 19 í kunngerð um felags reglur fyri yrkisútbúgvingar.
*Stk. 2.* Í almennum lærugreinum, sum Mentamálaráðið tekur út, verður farið til próvtøku eina ferð í 3., eina ferð í 5. og eina ferð í 7. skúlaskeiði.

## Kapittul 4
## Sveinaroynd

**§ 13.** Tá ið lærlingurin hevur staðið skúlapartin, og áðrenn lærlingurin hevur lokið verkligu læruna, verður farið til sveinaroynd.
*Stk. 2.* Treytin fyri at verða tikin upp til sveinaroynd er, at lærlingur hevur staðið øll skúlaskeiðini sambært § 11 og §12.
*Stk. 3.* Sveinaroyndin er býtt upp í tveir partar:
1) skrivlig roynd, og
2) verklig roynd.

*Stk. 4.* Tann skrivliga royndin er ein samansett roynd innan yrkislærugreinirnar. Loyvdir hjálparmiðlar í hesum sambandi eru nýttar lærubøkur, fylgiskjøl og lummaroknari, góðkend av skúlanum. Lærlingurin fær 180 minuttir til at svara spurningunum.
*Stk. 5.* Verkliga royndin fevnir um uppgávur innan persónbilavinnuna og fevnir um at taka sundur, finna brek, stilla motor, funktiónsroyndir, útskiftan, ísetan og roynd, sum lærlingurin ger í sambandi við skúlaundirvísingina. Lærlingurin fær í alt 12 tímar til at loysa uppgávurnar.
*Stk. 6.* Uppgávurnar verða býttar millum lærlingarnar við lutakasti. Verkstaðarhandbók og annað skrivligt tilfar skal vera tøkt hjá lærlinginum, meðan hann loysir uppgávuna. Royndin verður mett at vera liðug, tá ið lærlingurin sigur frá, og amboð o.a. eru reinsað og fingin uppá pláss.
*Stk. 7.* Lærarin og metingardómararnir skulu vera hjástaddir, meðan sveinaroyndin verður gjørd.

**§ 14.** Tá ið mett verður um skrivligu royndina, geva lærarin og báðir metingardómararnir í felag eitt próvtal. Í metingini verður dentur lagdur á førleikan hjá lærlinginum, sum ásett er í málunum fyri útbúgvingini, sambært § 7.
*Stk. 2.* Tá ið mett verður um verkligu royndina, geva lærarin og báðir metingardómararnir í felag próvtal fyri ávikavist:
1) tekniskan førleika, og
2) almennan og persónligan førleika til sjálvstøðugt og við nøktandi úrsliti at leggja til rættis og loysa arbeiðsuppgávur.

*Stk. 3.* Fyri at fara upp til verkliga partin av sveinaroyndini skal lærlingurin hava fingið í minsta lagið próvtalið 6 fyri skrivligu royndina.
*Stk. 4.* Fyri at standa sveinaroyndina krevst, at próvtalið fyri skrivligu royndina og miðaltalið av próvtølunum fyri verkligu royndina bæði eru í minsta lagi 6.

*Stk. 5.* Sveinaroyndarprótalið er miðaltalið av próvtalinum fyri skrivligu royndina og miðalprótalinum fyri verkligu royndina.
*Stk. 6.* Lærlingurin fær upplýst próvtøku úrslitið frá læraranum og báðum metingardómarunum beint eftir, at royndin er liðug.
*Stk. 7.* Skúlin sendir upplýsingarnar um prótal lærlingsins, sum er givið eftir stk. 5, til avvarðandi yrkisnevnd.

*Sjúkra- og endurpróvtøka*

**§ 15.** Sjúkra- og endurroynd verður skipað samsvarandi § 6, stk. 2 í kunngerð um próvtøkur í yrkis- og serlærugreinum og fremjingarreglur fyri yrkis- og sveinaroyndir, samanber eisini § 2, stk. 2 í kunngerðini um próvtøl (próvtalskunngerðin).

## Kapittul 5
## Gildiskoma

**§ 16.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og er eisini galdandi fyri lærlingar, sum hava byrjað læruna, áðrenn kunngerðin kemur í gildi.
*Stk. 2.* Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 6 frá 1. februar 2007 um bilsmiðútbúgving.

Mentamálaráðið, 23. apríl 2010

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

/ Una Joensen (sign.)

Nr. 29 27 apríl 2010

**Kunngerð**
**um**
**at flyta ogn frá Føroya Yvirformyndarí v.m.**

Við heimild í § 11, stk. 3 í løgtingslóg nr. 177 frá 22. desember 2009 um umsiting av ogn hjá ómyndugum og persónum undir verju o.a. verður ásett:

## Kapittul 1
## Ogn, sum skal flytast

**§ 1.** Ogn, ið verður umsitin í Føroya Yvirformyndarí vegna ómyndugar og horvnar persónar, verður flutt til umsiting í eini umsitingardeild í peningastovni, sum Innlendismálaráðið hevur góðkent, sbr. tó § 2, 1. pkt. og § 3, stk. 2, 2. pkt.

**§ 2.** Ogn hjá ómyndugum, sum ikki er størri enn 75.000 kr., verður útflýggjað verjanum at umsita. Er ognin heilt ella partvíst fíggjarkrav mótvegis verjanum, verður ognin tó flutt til eina umsitingardeild.

## Kapittul 2
## Raðfylgjan

**§ 3.** Ogn hjá aldursómyndugum eigur at verða flutt fyrst. Síðani verður ogn hjá persónum undir verju og horvnum persónum flutt.
*Stk. 2.* Ogn hjá aldursómyndugum og persónum undir verju eigur at verða flutt í aldursrað, soleiðis at ogn hjá eldri kontuhavum eigur at verða flutt áðrenn ogn hjá yngri kontuhavum. Ogn hjá aldursómyndugum, fødd áðrenn 31. desember 1994, verður tó umsitin í Føroya Yvirformyndarí, til kontuhavin gerst myndugur.

**§ 4.** Føroya Yvirformyndarí ásetir dagin, tá ogn verður útflýggjað verjanum at umsita, sbr. § 2, 1. pkt.

**§ 5.** Eru ognir, sum fleiri eiga saman, og har bert ein partur skal flytast sbrt. § 1 ella § 2, 2. pkt., verða allar ognir, sum eru fevndar av samognini, fluttar til umsiting í umsitingardeildini.

## Kapittul 3
## Heimild at avgera umsitingarstaðið

**§ 6.** Við tí avmarking, sum er í § 1, § 2, 2. pkt. og § 5, avger verjin hjá einum ómyndugum ognara komandi umsitingarstaðið. Er ein aldursómyndugur ognari fyltur 15 ár, tá tann í § 15 nevndna fráboðanin verður undirskrivað, skal verjin, um tað ber til, fáa váttan frá tí aldursómynduga.

**§ 7.** Hevur arvaleggjari ella gávugevari gilt avgjørt, at ogn, sum er bundin fyri ein ómyndugan, skal flytast til umsiting í umsitingardeild, tá kontuhavin gerst myndugur, verður ognin flutt til ávísta umsitingarstaðið.

**§ 8.** Við flyting av ogn, sum myndug og ómyndug eiga saman, avgera verjin hjá tí ómynduga og tann myndugi ognarin í felag komandi umsitingarstaðið.
*Stk. 2.* Er ein ogn gilt sett sum trygd heilt ella partvíst, verður avgerðin tikin av ognaranum saman við verjanum hjá tí, sum hevur trygd í ognini.

**§ 9.** Við flyting av rentunjótingarogn, har gevarin eigur rentunjótingina, verður avgerðin tikin av verjanum hjá tí ómynduga ognaranum og rentunjótaranum ella verjanum hjá tí ómynduga rentunjótaranum í felag. Tað sama er galdandi í teimum førum, tá rentunjótingarrætturin er ásettur í testamenti, sum er gjørt av rentunjótaranum og arvaleggjaranum í felag.

**§ 10.** Ogn hjá horvnum verður flutt í góðkenda umsitingardeild sbr. § 1.

**§ 11.** Eigur eitt deyðsbúgv ognirnar, avger deyðsbússkiftarin komandi umsitingarstaðið. Eru ein ella fleri av deyðsbússkiftarunum ikki førir fyri at taka lut í avgerðini, verður avgerð um komandi umsitingarstaðið tikin av hinum deyðsbússkiftarunum.
*Stk. 2.* Í teimum í § 9, 2. pkt. nevndu førum verður avgerðin tikin saman við verjanum fyri rentunjótaran og myndugar rentunjótarar.
*Stk. 3.* Er ongin deyðsbússkiftari, ella er ongin deyðsbússkiftari førur fyri at taka lut í avgerðini, avgera verjin fyri rentunjótaran og myndugir rentunjótarar í felag komandi umsitingarstaðið.

**§ 12.** Er ikki semja um umsitingarstaðið millum verjar fyri ómyndugar ognarar, ella millum verjar fyri ómyndugar ognarar og myndugar ognarar, verður ognin flutt til tað staðið, sum verður ávíst av verjum ella myndugum ognarum, sum umboða tann størsta partin av ognunum.
*Stk. 2.* Er ikki semja millum verjar fyri ómyndugar rentunjótarar ella millum verjar fyri ómyndugar rentunjótarar og myndugar rentunjótarar til somu ogn, verður ognin flutt til tað staðið, sum verður ávíst av verjum ella myndugum rentunjótarum, sum umboða ta størsta rentunjótingina um tað mundið, ognin skal flytast.

**§ 13.** Føroya Yvirformyndarí avger umsitingarstaðið í førum,
1) tá biðið verður um at flyta ogn í stríð við § 1 ella § 2, 2. pkt.,
2) tá áheitan um flyting ikki er móttikin rættstundis,
3) tá tað ikki hevur verið møguligt at fáa eina umbøn um flyting frá tí, sum hevur heimild at biða um tað, og

4) tá tað annars ikki er møguligt út frá teimum áheitanum, sum eru innkomnar, at ávísa eitt umsitingarstað eftir reglunum í §§ 6-12.

*Stk. 2.* Avger Føroya Yvirformyndarí komandi umsitingarstaðin, skal ognin flytast til eina av teimum í § 1 nevndu umsitingardeildunum. Við flyting av slíkari ogn skal Føroya Yvirformyndarí hava fyrilit fyri bústaðin hjá kontuhava og verja.

**§ 14.** Skulu fleiri avgera komandi umsitingarstaðin fyri einari ogn, verður ognin flutt sambært teimum áheitanum, sum lúka treytirnar, meðan tað verður sæð burtur frá førum, sum eru fevnd av § 13, stk. 1.

**§ 15.** Føroya Yvirformyndarí biður skrivligt verjar, kontuhavar og onnur sum hava rætt til at taka avgerð um ognirnar, innan 1 mánaða skrivliga at upplýsa, hvussu verða skal við ognini. Fyri kontuhavar, verjar v.m., sum búgva uttanlands, er freistin 2 mánaðir. Er tað noterað á kontuna, at fráboðanir viðvíkjandi ognini skulu sendast einum øðrum enn verjanum, sendir Føroya Yvirformyndarí eitt avrit av skrivinum til hendan.

*Stk. 2.* Áheitanin til Føroya Yvirformyndarí skal undirskrivast av verjanum persónliga ella hansara vegna av einum advokati, peningastovni ella sambært skrivliga fulltrú.

**§ 16.** Í sambandi við flyting av ogn til eitt umsitingarstað skal samstundis verða fráboðað, at flytingin verður gjørd við heimild í § 11, stk. 3 í løgtingslóg um umsiting av ogn hjá ómyndugum og persónum undir verju o.a.

*Stk. 2.* Føroya Yvirformyndarí skal geva umsitingarstaðnum upplýsing um:

1) Navn, bústað og p-tal hjá tí, sum í Føroya Yvirformyndarí er skrivaður sum eigari av ognini, og møguligar rentunjótarar ella onnur, sum hava rættindi yvir ognini, umframt navn og bústað hjá verjanum hjá einum ómyndugum ognara.
2) Orsøkin til at ognin er sett í Føroya Yvirformyndarí.
3) Umstøður, sum hava týdning fyri umsitingina av ognini, um ikki hetta sæst á ognini ella í skjølum, sum verða flutt saman við ognini. Tað skal tó altíð upplýsast, hvussu rentan verður ávíst, um Føroya Yvirformyndarí sambært avtalu við verjan keypir virðisbrøv fyri fingnan reiðupening, um Føroya Yvirformyndarí rindar framhaldandi ognarútgjalding, tryggingargjøld, afturheldur til endurgjald fyri skuld, mótroknar rentur og líknandi.
4) Mál, sum Føroya Yvirformyndarí metir hava stóran týdning fyri komandi umsitingina.

**§ 17.** Til nýtslu hjá umsitingardeildini verður hjálagt:

1) Ein kontuútskrift í 2 eintøkum, sum inniheldur upplýsing um navn, bústað, p-tal hjá kontuhava, ein uppgerð yvir ogn, sum verður flutt, og eina nágreining av hvørjari einkultari ogn. Fyri lánsbrøv, partabrøv og líknandi ogn skal litra og nummar tilskilast.
2) Testamenti við møguligum ískoytum (kodicil) og kongaligum staðfestingum, gávubrøv, verjutilnevningar, deyðsbússkiftaraloyvir, avtalur um serstakar uppsparingarskipanir og líknandi skjøl viðvíkjandi grundarlagnum fyri at seta ognina í Føroya Yvirformyndarí.
3) Onnur skjøl, sum Føroya Yvirformyndarí metir hava týdning fyri framhaldandi umsitingina.

*Stk. 2.* Umsitingarstaðið, sum móttekur ognirnar, skal vátta fyri móttøkuna á tí eina eintakinum av kontuútskriftini.

*Stk. 3.* Skjølini nevnd í stk. 1, nr. 1-3 verða eftir meting hjá Føroya Yvirformyndarí hjáløgd sum frumrit ella avrit.

*Stk. 4.* Øll skjøl, sum ikki verða flutt til umsitingardeildina, verða savnsgoymd hjá Innlendismálaráðnum.

**§ 18.** Virðisbrøv, sum hava átekning um, at tey eru undir umsiting hjá Føroya Yvirformyndarí, skal komandi umsitingarstaðið geva átekning um, at tey sambært § 11, stk. 3 í løgtingslóg um umsiting av ogn hjá ómyndugum og persónum undir verju o.a. eru flutt frá Føroya Yvirformyndarí og komin undir umsiting hjá umsitingarstaðnum. Umsitingardeildin skal samstundis fáa átekningina noteraða.

*Stk. 2.* Tinglýst veðbrøv í fastogn ella leysafæ ella onnur tinglýst skjøl skal Føroya Yvirformyndarí geva átekning um, at tey sambært § 11, stk. 3 í løgtingslóg um umsiting av ogn hjá ómyndugum og persónum undir verju o.a. eru flutt úr Føroya Yvirformyndarí og flutt til umsiting hjá viðkomandi umsitingarstaði, og at fráboðanir sambært kap. 51 í rættargangslógini fyri Føroyar og aðrar fráboðanir, sum sambært lógini skulu sendast veðognara, framyvir skulu sendast til umsitingarstaðið. Umsitingarstaðið skal fáa fráboðanarátekningina tinglýsta.

*Stk. 3.* Onnur virðisbrøv, sum hava átekning um, at tað ikki uttan samtykki frá Føroya Yvirformyndarí má ráðast yvir tey, skal umsitingarstaðið geva átekning um, at tey sambært § 11, stk. 3 í løgtingslóg um umsiting av ogn hjá ómyndugum og persónum undir verju o.a. eru komin undir umsiting hjá viðkomandi umsitingarstaði, og at tað framyvir ikki kann ráðast yvir ognini uttan samtykki frá umsitingarstaðnum.

**§ 19.** Føroya Yvirformyndarí skal ansa eftir, at broytingar í upprunaliga innihaldinum í privatum ognum síggjast, og at restskuldin verður nevnd, um tann upprunaliga upphæddin er minkað.

**§ 20.** Verjar fyri ómyndugar ognarar ella rentunjótarar, myndugir ognarar og rentunjótarar og aðrir rættindahavar eins og skuldarar, tryggingarfeløg og onnur, sum hava skyldur mótvegis ognunum, skulu

fáa fráboðan frá Føroya Yvirformyndarí um flytingina. Eisini gevur Føroya Yvirformyndarí fráboðan til aðrar myndugleikar, sum kunnu hugsast at hava áhuga í at vita, hvussu ognirnar verða umsitnar. Komandi umsitingarstaðið fær at vita, hvør hevur fingið fráboðan um flytingina.

**§ 21.** Henda kunngerðin kemur í gildi 1. mai 2010.

Innlendismálaráðið, 27. apríl 2010

**Annika Olsen (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Rúni Joensen (sign.)

Nr. 30 27.apríl 2010

# Kunngerð
# um
# umsiting hjá Føroya Yvirformyndarí av ogn hjá ómyndugum v.m., sum skal flytast frá Føroya Yvirformyndarí

Við heimild í § 11, stk. 3 í løgtingslóg nr. 177 frá 22. desember 2009 um umsiting av ogn hjá ómyndugum og persónum undir verju o.a. verður ásett:

**§ 1.** Ogn, sum sambært § 11, stk. 1 skal flytast frá Føroya Yvirformyndarí til umsiting í eini umsitingardeild, ella sum sambært § 11, stk. 2 verður innlatin til Føroya Yvirformyndarí, verður inntil flyting av ognini frá Føroya Yvirformyndarí umsitin eftir reglunum í §§ 2-13 í hesi kunngerð. Tað sama er galdandi fyri ogn, sum skal útflýggjast verjanum til umsiting sambært § 2, 1. pkt. í kunngerð um at flyta ogn frá Føroya Yvirformyndarí v.m.

**§ 2.** Ognin verður sett sum kontant innistandandi í peningastovn ella í virðisbrøv til serstaka umsiting.

**§ 3.** Kontant innistandandi verður sett á anfordring ella uppsøgn. Uppsagnarfreistin er 3 ella 12 mánaðar. Uttan ávaring kann verða biðið um, at ogn, sett á anfordring, verður brúkt til keyp av virðisbrøvum ella sett á uppsøgn. Ogn, sett á uppsøgn, kann við tí fyri kontuna galdandi freist verða biðið um at verða sett á anfordring ella á kontu við styttri uppsagnarfreist.
*Stk. 2.* Tá kontuhavin gerst myndugur, ella umsitingin av ognini heilt ella partvíst heldur uppat við frígeving ella av øðrum grundum, heruppií við flyting til eina umsitingardeild, verður goldið út uttan uppsøgn.

**§ 4.** Áheitan um broyting av, hvussu ogn verður sett, skal sendast Føroya Yvirformyndarí. Ogn hjá aldursómyndugum kontuhava kann ikki verða sett á uppsøgn soleiðis, at kontuhavin gerst myndugur, áðrenn uppsagnarfreistin er úti.
*Stk. 2.* Um serstakar umstøður tala fyri tí, kann Føroya Yvirformyndarí aftur fyri eitt rentuendurgjald geva loyvi til, at ogn, sum er sett á uppsøgn, uttan ávaring ella við styttri freist enn galdandi fyri kontuna, verður brúkt til at keypa virðisbrøv. Rentuendurgjaldið verður ásett av Innlendismálaráðnum eftir tilmæli frá Landsbankanum.

**§ 5.** Er ongin áheitan komin um ávísa setan av reiðum peningi, verður peningurin settur á 3 mánaða uppsøgn. Verður innan 6 mánaðir aftan á inngjaldingina áheitan sett fram um keyp av virðisbrøvum ella um at seta á anfordring, verður peningurin roknaður at vera settur á anfordring frá inngjaldingardegnum. Upphæddir, sum fáast við útdraging av lánsbrøvum, innfrían av veðbrævi ella líknandi, verða altíð settar á anfordring.

**§ 6.** Rentustøðið fyri reiðan pening verður ásett av Innlendismálaráðnum eftir tilmæli frá Landsbankanum. Føroya Yvirformyndarí skal almannakunngera broyting í rentustøðinum í dagbløðunum og miðlunum. Rentustøðið skal hvønn 1. januar og 1. juli kunngerast á heimasíðuni hjá Innlendismálaráðnum.
*Stk. 2.* Rentan verður roknað 1 ár í senn til tann 11. desember.
*Stk. 3.* Nýggur reiður peningur og upphæddir, sum stava frá ognum undir framíhjá umsiting, og sum fáast við sølu ella innfrían ella á líknandi hátt, verða rentaðar frá fyrsta degi aftan á inngjaldingina.
*Stk. 4.* Reiður peningur, sum verður útgoldin ella fluttur frá Føroya Yvirformyndarí, verður rentaður til seinasta dagin undan ávísingardegnum. Upphæddir, ið verða brúktar til keyp av virðisbrøvum, verða tó rentaðar til rentuavrokningardagin á keypsrokningini.

**§ 7.** Falnar rentur, sum ikki verða útgoldnar, verða lagdar afturat kontuni. Rentur, sum eru lagstar afturat í nærmasta undanfarna árinum, kunnu tó eftir áheitan verða útgoldnar. Afturatlagdar rentur verða rentaðar frá gjaldkomudegnum.
*Stk. 2.* Føroya Yvirformyndarí kann gera av, at falnar rentur ikki kunnu verða útgoldnar ella bara partvíst verða útgoldnar, um ein verji við roknskaparskyldu ikki letur inn roknskap, ella um serstakar umstøður eru.

**§ 8.** Reiður peningur, sum ein ómyndugur ella horvin kontuhavi eigur, kann verða settur í virðisbrøv eftir reglunum í kunngerð um umsiting av ogn hjá ómyndugum og persónum undir verju. Virðisbrøv kunnu verða umbýtt eftir somu reglum. Heldur Føroya Yvirformyndarí, at umbýtið ikki er til frama fyri áhugamálini hjá kontuhavanum, verður málið lagt fyri Innlendismálaráðið.
*Stk. 2.* Ogn, sum aðrir kontuhavar eiga, verður sett eftir teimum reglum, sum eru galdandi fyri hesar ognir.

**§ 9.** Virðisbrøv, sum eru givin Føroya Yvirformyndarí at umsita, ella sum Føroya Yvirformyndarí keypir fyri rokning hjá kontuhava, verða umsitin framíhjá.
*Stk. 2.* Undirskrift hjá Føroya Yvirformyndarí kemur í staðin fyri undirskrift hjá kontuhavanum viðvíkjandi einihvørjari avgerð um framíhjá umsitin virðisbrøv.
*Stk. 3.* Broyting í trygdini fyri ella av skyldunum sambært framíhjá umsitin virðisbrøv, heruppí skuldaryvirtøka, skal góðkennast av Føroya Yvirformyndarí. Avgerðin verður tikin sambært váttan frá verjanum

ella tí mynduga kontuhavanum. Góðkenning kann ikki verða givin ímóti ynskinum hjá verja ella myndugum kontuhava.

**§ 10.** Veðbrøv í fastogn, sum heilt ella partvíst verður útløgd ella flutt til ein kontohava í Føroya Yvirformyndarí, skulu gevast átekning um, at veðbrævið er fevnt av umsiting hjá Føroya Yvirformyndarí, og at fráboðanir sambært kapittul 51 í rættargangslógini og aðrar fráboðanir, sum sambært lógini skulu gevast veðognarum, frameftir skulu sendast Føroya Yvirformyndarí. Fráboðanarátekningin skal tinglýsast.

**§ 11.** Fellur grundarlagið fyri ognarumsitingini hjá Føroya Yvirformyndarí burtur, skal ognin fara úr umsiting hjá Føroya Yvirformyndarí. Hevur kontuhavin ikki innan eina freist upp á í mesta lagi 6 mánaðir, sum Føroya Yvirformyndarí ásetir, upplýst, hvussu vera skal við ognini, verður ognin deponerað sambært Lov nr. 29 af 16. februar 1932 om skyldneres ret til at frigøre sig ved deponering. Bundin ogn verður tó flutt til eina umsitingardeild, sum er góðkend at umsita bundnan tvingsilsarv, samsvarandi avgerð hjá einum myndugum kontuhava, um ikki tað í testamenti, gávubrævi v.m. er tikin gild avgerð um eitt annað umsitingarstað.

**§ 12.** Hendan kunngerð kemur í gildi 1. mai 2010.

Innlendismálaráðið, 27. apríl 2010

**Annika Olsen (sign.)**
landsstýriskvinna

/Rúni Joensen (sign.)

Nr. 31 27. apríl 2010

# Kunngerð
# um
# umsiting av ogn hjá ómyndugum og persónum undir verju

Við heimild í §§ 6, 7 og 8, í løgtingslóg nr. 177 frá 22. desember 2009 um umsiting av ogn hjá ómyndugum og persónum undir verju o.a. verður ásett:

**§ 1.** Hendan kunngerðin er galdandi fyri verjumál fyri ómyndug og fyri fíggjarlig viðurskifti fevnd av øðrum verjumáli fyri vaksin eftir kapittul 1 og 2 í verjumálslógini, Anordning nr. 397 frá 20. apríl 2010 om ikrafttræden for Færøerne af værgemålsloven.

## Kapittul 1
## Hvar skal ogn setast

**§ 2.** Reglurnar í hesum kapitlinum eru galdandi fyri
1) ogn, sum skal umsitast í eini góðkendari umsitingardeild, sbr. § 2, stk. 1 í løgtingslóg um umsiting av ogn hjá ómyndugum og persónum undir verju o.a., og
2) ogn, sum verður umsitin av verjanum, sbr. § 2, stk. 2, nr. 2 í løgtingslógini

**§ 3.** Ogn, sum ikki er sett inn sum kontant innistandandi, skal setast í virðir eftir niðanfyristandandi reglum.

**§ 4.** Setast kann í rentuberandi lánsbrøv, um hesi vera handlaði á einum skipaðum marknaði, sbr. stk. 2, og eru útgivnin í eini peningaeind hjá einum av teimum í stk. 2 nevndu londunum.
*Stk. 2.* Er marknaðurin í einum EU/EØS-landi, skal marknaðurin lúka treytirnar, nevndar í artikul 4, nr. 14 í "direktiv om markeder for finansielle instrumenter". Er marknaðurin uttan fyri eitt ES/EØS-land, skal marknaðurin vera limur av The World Federation of Exchanges og vera í einum landi, sum er fullur limur í Felagsskapinum fyri Fíggjarligum Samarbeiði og Menning (OECD).
*Stk. 3.* Setast kann ikki í premiulánsbrøv.
*Stk. 4.* Reglurnar í § 10, stk. 1, 1. pkt. og stk. 2 vera brúktar samsvarandi, tá sett verður í vinnulánsbrøv og konvertibul lánsbrøv.

**§ 5.** Lánsbrøv kunnu ikki keypast fyri ein prís, sum fer upp um áljóðandi virðið. Lánsbrøv, sum verða útdrigin við einum ískoyti upp á eitt ávíst prosenttal av áljóðandi virðinum, kunnu tó keypast fyri ein prís, sum ikki fer upp um útdragingarupphæddina.

**§ 6.** Í mesta lagi helvtin av ognini, sbr. tó § 7, stk. 2, § 9, stk. 3, og § 11, kann setast í
1) vinnulánsbrøv og konvertibul lánsbrøv,
2) vinningsbýtisgevandi íløgufeløg ella deildir hjá slíkum,
3) sparikassaskjøl fyri ábyrgdarkapital og lutakassaskjøl fyri lutakapital, og
4) partabrøv.

**§ 7.** Setast kan í partar av vinnisbýtisgevandi íløgufeløgum ella deildir hjá slíkum, um hesar koma undir "lov om investeringsforeninger og specialforeninger samt andre kollektive investeringsordninger m.v." ella samsvarandi ES/EØS-lóggávu. Tað er ein treyt, at tað í viðtøkunum hjá íløgufelagnum ikki er áseting um
1) at felagið kann geva árligan stuðul av ognini til humaniterar ella almenngagnligar felagsskapir,
2) at felagið kann luta út av síni ogn tey ár, tá vinningurin av íløgum ikki samsvarar við tørvin fyri inntøku, ella
3) at útloysing ikki kann vera gjørd í einum frammanundan ásettum tíðarskeiði.
*Stk. 2.* Øll ogn kann, uttan mun til markið í § 6, verða sett í partar av íløgufeløgum ella deildir hjá slíkum, um felagið ella deildin sambært viðtøkum sínum einans kann gera íløgur í lánsbrøv, sum lúka krøvini í § 4, stk. 1 og 2, og um tað sambært viðtøkunum í mesta lagi kann setast 50 prosent í vinnulánsbrøv, og um tað ikki kann verða sett í premiulánsbrøv og konvertibul lánsbrøv. Tað er eisini ein treyt, at viðtøkurnar hjá íløgufelagnum ikki hava ásetingar, som nevnt í stk. 1, 2. pkt., nr. 1-3.

**§ 8.** Tað kann vera sett í sparikassaskjøl fyri ábyrgdarkapital ella lutakassaskjøl fyri lutakapital, um skjølini sambært viðtøkum sparikassans ella lutakassans eru umsetilig.
*Stk. 2.* Reglurnar í § 10, stk. 1, 1. pkt. og stk. 2 verða brúktar samsvarandi.

**§ 9.** Tað kann verða sett í partabrøv, um hesi verða handlaði á einum skipaðum marknaði, sbr. stk. 2, og eru útgivin í eini peningaeind hjá einum av teimum í stk. 2 nevndu londunum.
*Stk. 2.* Er marknaðurin í einum EU/EØS-landi, skal marknaðurin lúka treytirnar, nevndar í artikul 4, nr. 14 í "direktiv om markeder for finansielle instrumenter". Er marknaðurin uttan fyri eitt ES/EØS-land, skal marknaðurin vera limur av The World Federation of Exchanges og vera í einum landi, sum er fullur limur í Felagsskapinum fyri Fíggjarligum Samarbeiði og Menning (OECD).
*Stk. 3.* Við víðkan av partabrøvum kann tekningarrætturin, sum er knýttur til partabrøvini, verða brúktur, hóast farið verður út um markið, sum er ásett í § 6, og hóast partabrøvini ikki lúka treytirnar í stk. 1 og 2.

Tað sama er galdandi við móttøku av frípartabrøvum (fondsaktier).

**§ 10.** Í einum felagi kunnu í mesta lagi keypast partabrøv svarandi til 15 prosent av partapeningi felagsins. Harafturat kunnu einans keypast partabrøv, sum sambært avgerð, tikin á seinasta vanliga aðalfundi felagsins, hava givið vinning, sbr. tó stk. 4.
*Stk. 2.* Í mesta lagi 15 prosent av ognini kann setast í partabrøv í einum felagi.
*Stk. 3.* Reglurnar í stk. 1 og 2 verða ikki brúktar upp á frípartabrøv (fondsaktier) ella partabrøv, sum við víðkan av partabrøvum verða fingin við at brúka tekningarrættin, sum er knýttur til partabrøvini.
*Stk. 4.* Við umskipan av sparikassum og lutakassum til partafeløg eftir §§ 207-213 i "lov om finansiel virksomhed" kunnu sparikassaskjøl fyri ábyrgdarkapital og lutakassaskjøl fyri lutakapital, uttan mun til stk. 1, 2. pkt. verða umbýtt við partabrøv eftir § 208, stk. 2 í nevndu lóg. Verður tað við umskipanini gjørt eitt holdingfelag, sum skal halda fram við sparikassapartafelagnum ella lutakassapartafelagnum, kunnu skjølini, uttan mun til stk. 1, 2. pkt. verða umbýtt við partabrøv í holdingfelagnum.

**§ 11.** Upphæddir, sum verða fingnar við avhending af ognum, sum nevnt í § 6, kunnu aftur verða settar í samsvarandi ognir, hóast farið verður út um markið, sum er ásett í § 6.

**§ 12.** Við keyp av ogn verður útrokningin av mørkunum í § 6 og § 10, stk. 2 gjørd grundað á kursvirðið á teimum ognum, sum verða umsitnar av eini umsitingardeild um tað mundið, tá fleiri ognir verða fingnar. Um ongin almenn kursáseting er, verður skjalprógvaða handilsvirðið lagt til grund.
*Stk. 2.* Umsitur verjin ogn eftir § 2, stk. 2, nr. 2 í løgtingslóg um umsiting av ogn hjá ómyndugum og persónum undir verju o.a., verður virðið av hesum ognum um tað mundið, tá fleiri ognir verða fingnar, lagt til grund fyri útrokningini eftir stk. 1.

**§ 13.** Ogn kann setast í í fastogn aftur fyri tinglýst veð í ognini, um veðbrævið saman við frammanfyristandandi prioritetum umroknaðir til kontantvirðið, hevur eina trygd, sum er innan fyri 80 prosent av virðismetingini, og um ognin hevur hóskandi brunatrygd.
*Stk. 2.* Veðbrævið kann ikki verða keypt fyri ein prís, sum er hægri enn restskuldin.

**§ 14.** Ogn, sum aftur fyri veð, verður sett í fastogn, sum verjin eigur, skal góðkennast av Tryggingareftirlitinum.
*Stk. 2.* Ogn, sum aftur fyri veð, verður sett í fastogn, sum varandi heilt ella partvíst er innrættað og ætlað til serligt vinnuvirksemi, skal góðkennast av Tryggingareftirlitinum.

**§ 15.** Tryggingareftirlitið kann geva loyvi til, at ogn verður sett í á annan hátt enn ásett í hesum kapitlinum, um serligar umstøður tala fyri hesum.

## Kapittul 2.
## Umsiting

**§ 16.** Ogn, sum er 75.000 kr. ella hægri, skal umsitast í eini góðkendari umsitingardeild, sbr. løgtingslóg um umsiting av ogn hjá ómyndugum og persónum undir verju o.a. § 2, stk. 1.
*Stk. 2.* Ogn, sum er minni enn 75.000 kr., skal umsitast í eini umsitingardeild, um hendan frammanundan umsitur ogn, ella um tað verður roknað við, at ognin seinni fer upp um 75.000 kr.
*Stk. 3.* Um ognin seinni fer undir 75.000 kr., og tað ikki kann roknast við, at ognin aftur gerst 75.000 kr. ella hægri, letur umsitingardeildin eftir áheitan verjanum ognina.
*Stk. 4.* Er ognin heilt ella partvís eitt krav mótvegis verjanum, skal ognin altíð umsitast í eini umsitingardeild.

**§ 17.** Verjin umsitur ogn, sum ikki sambært løgtingslógini um umsiting av ogn hjá ómyndugum og persónum undir verju o.a. § 2, stk. 1, skal umsitast í eini umsitingardeild. Ríkisumboðsmaðurin kann tó, um serligar grundir eru fyri hesum, gera av, at ognin, sum verður umsitin av verjanum, skal umsitast í eini umsitingardeild.

**§ 18.** Ogn, sum skal umsitast í eini umsitingardeild, kann ikki verða umsitin í fleiri umsitingardeildum.
*Stk. 2.* Verjin avger í hvørjari umsitingardeild, ognin skal verða umsitin. Umsitingardeildin skal við 3 mánaðar ávaring flyta ognina til umsiting í eini aðrari umsitingardeild, um verjin biður um tað.
*Stk. 3.* Reglan í stk. 2 er ikki galdandi, um tað í testamenti ella við gávubrævi er avgjørt, at ognin skal umsitast í eini ávísari umsitingardeild. Hevur ein arvaleggjari ella ein gávugevari tikið slíka avgerð, kan verjin einans krevja at fáa ognina flutta í eina aðra umsitingardeild, um Tryggingareftirlitið játtar hesum.
*Stk. 4.* Ein umsitingardeild, sum hevur fingið ogn at umsita, kann einans við játtan frá Tryggingareftirlitinum uppsiga umsitingina.

**§ 19.** Av inntøkunum kann verjin, uttan mun til um ein møgulig ogn verður umsitin av verjanum ella av eini umsitingardeild, lata eina upphædd upp á í mesta lagi 20.000 kr., ella tað, sum harumframt má roknast at vera neyðugt til framhaldandi útreiðslur, standa á eini serligari kontu í einum peningastovni hjá tí, sum er undir verju. Verjin skal geva kontuni átekning um, at hon er fevnd av umsiting verjans.
*Stk. 2.* Verjin kan harafturat, hóast reglurnar í kapittul 2, hava hjá sær reiðan pening upp til 1.500 kr, um hetta má roknast at vera neyðugt.

*Latan av ogn til eina umsitingardeild*

**§ 20.** Almennir myndugleikar, tryggingarfeløg, pensjónskassar og peningastovnar, sum gjalda út framhaldandi veitingar til verjan, skulu boða frá hesum. Fráboðan skal altíð gevast Ríkisumboðsmanninum. Fráboðanin skal eisini gevast til umsitingardeildina, um hendan umsitur ogn fyri tann, sum er undir verju. Fráboðanin skal upplýsa navn og bústað hjá verjanum, og navn, bústað og p-tal hjá tí, sum er undir verju, umframt støddina á mánaðarligu bruttoveitingini um tað mundið, tá boðað verður frá.

*Stk. 2.* Tað skal ikki gevast fráboðan um pensjónsveitingar, sum verða útgoldnar sambært almannapensjónslógini.

**§ 21.** Frammanundan ella samstundis sum ogn verður latin eini góðkendari umsitingardeild at umsita, skal tann, sum rindar inn ognina, lata inn eina umsitingarfráboðan til umsitingardeildina. Avrit av møguligum testamenti, búsuppgerð, gávubrævi ella annað skjalprógv skal leggjast við. Eisini skal hjáleggjast dóps- ella føðiváttan og skjalprógv fyri p-talinum hjá tí, sum er undir verju. Er verjin tilnevndur, skal verjutilnevningin hjáleggjast.

**§ 22.** Umsitingarfráboðanin skal upplýsa

1) navn, bústað og p-tal hjá tí, sum er undir verju,
2) navn, bústað og p-tal hjá verjanum,
3) hvaðani ognin stavar frá,
4) møguligar serligar ásetingar í umsitingargrundarlagnum um útgjald av rentum og vinningsbýti og um útgjald av ognini,
5) støddin og samansetingin av ognini, og
6) um kontohavari fær pensjón.

*Stk. 2.* Um ogn, sum er fevnd av verjumálinum, er bundin, skal umsitingarfráboðanin upplýsa, sum ásett í stk. 1, umframt upplýsa um

1) navn arvaleggjarans og bústaðin við deyða og deyðsdagin,
2) hvussu búgvið er uppgjørt,
3) longd á ognarbindingini, og
4) í hvønn mun kapitalurin er tvingsilsarvur, men einans um frávik við testamenti er gjørt frá vanligu reglunum um umsiting av bundnum arvi.

**§ 23.** Umsitingardeildin skal hava teldutilfar um stovnaðar kontur tøkt til Tryggingareftirlitið, tá biðið verður um tað. Tilfarið skal fyri hvørja kontu sær innihalda upplýsing um

1) p-tal hjá tí, sum er undir verju,
2) kontunummar í umsitingardeildini,
3) dagfesting tá kontan varð stovnað,
4) støddin og samansetingin av ognini, gjørt upp á lánsbrøv, partabrøv, reiðuupphædd og annað,
5) um ognin er bundin, fyri rentunjótingarkapital eisini upplýsing um, um tann, sum er undir verju, er kapitaleigari ella rentunjótari, og
6) um verjin er roknskaparskyldugur

*Stk. 2.* Teldutilfarið skal latast í einum excel-fíli og sendast Tryggingareftirlitið á cd-rom.

**§ 24.** Umsitingardeildin skal ansa eftir, at ognin, sum sambært umsitingarfráboðanini skal latast inn til umsitingardeildina, verður latin inn.

*Stk. 2.* Tvingsilsinnheinting av ogn kann vanliga einans verða framd við samtykki verjans.

**§ 25.** Umsitur umsitingardeildin ogn, skal deildin gera ta skráseting, notering og tinglýsing, sum er nevnd í § 4 í Bekendtgørelse for Færøerne om værgemål, fyri ta ogn, sum verður umsitin í umsitingardeildini við tilskilan um, at ognin er undir umsiting v.m. hjá umsitingardeildini.

*Stk. 2.* Fyri hvørt verjumál sær skal umsitingardeildin árliga gera eitt yvirlit yvir ognirnar, sum deildin umsitur. Yvirlitið skal eisini vísa tilgongd og frágongd í árinum. Yvirlitið skal fylgja álmanakkaárinum.

*Umsiting hjá umsitingardeildini*

**§ 26.** Umsitingardeildin skal innseta reiðan pening á uppsøgn til hægstu vanligu innlánsrentu ella eftir áheitan frá verjanum setast á anfordring. Tá ein upphædd verður fingin við útdraging, innfrían ella á annan hátt, skal umsitingardeildin boða verjanum frá hesum við umbøn um at upplýsa, hvussu ognin skal setast, um tað ikki er gjørd serlig avtala um hetta.

*Stk. 2.* Fer upphæddin, sum stendur á anfordring, upp um 75.000 kr., skal umsitingardeildin skrivliga kunna verjan um hetta og biðja verjan avgera, hvussu upphæddin skal setast. Verjin skal samstundis fáa fráboðan um, at um umsitingardeildin ikki innan 2 mánaðir hevur fingið áheitan um ávísa setan, so verður innistandandi reiðupeningurin settur á uppsøgn til hægstu vanligu innlánsrentu.

*Stk. 3.* Reglurnar í stk. 2 verða ikki brúktar, um umsitingardeildin veit, at upphæddin um stutta tíð aftur fer niður um 75.000 kr.

**§ 27.** Umsitingardeildin skal ansa eftir, at setan aftur (“genanbringelse”) verður gjørd samsvarandi § 3 í løgtingslóg um umsiting av ogn hjá ómyndugum og persónum undir verju o.a. og kapittul 2 í hesi kunngerð.

**§ 28.** Umsitingardeildin kann vanliga einans við samtykki frá verjanum selja ogn, uppsiga veðbrøv og skuldarbrøv, brúka ella selja tekningarrættindi ella partabrævarættindi og seta reiðan pening í. Slík gerð kann fremjast uttan samtykki verjans, um tað ikki ber til at fáa váttan frá verjanum, ella gerðin er neyðug fyri at varðveita kapitalin.

*Stk. 2.* Áheitan um rættarlig stig grundað á umsitin virðisbrøv, kann vanliga einans verða innlatin við samtykki frá verjanum. Er verjin skuldnari sambært virðisbrævinum, kann slík áheitan einans verða latin inn við góðkenning frá Ríkisumboðsmanninum.

**§ 29.** Umsitingardeildin skal góðkenna broyting í trygdini um ella í skyldunum sambært virðisbrøvum, heruppií skuldaryvirtøku. Avgerðin krevur vanliga samtykki frá verjanum.
*Stk. 2.* Er verjin skuldnari sambært virðisbrævinum, krevja broytingar eftir stk. 1 góðkenning frá Ríkisumboðsmanninum.
*Stk. 3.* Undirskrift hjá umsitingardeildini kemur í staðin fyri undirskrift verjans við umsitnum ognum.

**§ 30.** Gevur verjin ikki samtykki eftir reglunum í § 24, stk. 2, § 28, stk. 1 og 2, og § 29, stk. 1, og heldur umsitingardeildin, at hetta ikki er í samsvari við áhugamálini hjá tí, sum er undir verju, skal spurningurin leggjast fyri Tryggingareftirlitið. Tað sama er galdandi, um umsitingardeilin annars heldur avgerðir verjans ikki vera í samsvari við áhugamálini hjá tí, sum er undir verju.

**§ 31.** Umsitingardeildin skal í umsitingini av veðbrøvum og øðrum virðisbrøvum, sum eru útgivin sambært "bekendtgørelse om ydelse af henstand med udbetaling af umyndige livsarvingers arv" ansa eftir, at treytir í virðisbrævinum um rindan av rentu og aðrar serligar treytir verða hildnar.

**§ 32.** Atkvøðurættin sambært umsitnum ognum hevur verjin, um ikki annað er avgjørt. Umsitingardeildin skal taka sær atkvøðurættin, um umsitingardeildin gerst varug við, at tað er neyðugt fyri at varðveita ognina ella fyri at tryggja framtíðar vinning av ognini.
*Stk. 2.* Fellur vinningurin til ein annan enn kapitaleigaran, fellur atkvøðurætturin altíð til umsitingardeildina, um ikki annað er avgjørt.

**§ 33.** Umsitingardeilin skal annars ansa eftir, at ognin verður umsiting á tryggjandi hátt, heruppií at virðisbrøv ikki fyrnast.

**§ 34.** Umsitingardeildin skal ansa eftir, at útgjalding av ogn ella partar av henni einans verður gjørd við góðkenning frá Ríkisumboðsmanninum, sbr. § 39 í verjumálslógini.
*Stk. 2.* Letur verjin inn umsókn til umsitingardeildina um frígeving av ogn, skal umsitingardeildin senda umsóknina víðari til Ríkisumboðsmannin við upplýsing um støðd og samanseting av ognini og møguligar aðrar upplýsingar.

**§ 35.** Falnar rentur verða eftir áheitan útgoldnar til verjan inntil 12 mánaðir aftaná forfallstíð, sbr. tó stk. 2.
*Stk. 2.* Umsitingardeildin kann við góðkenning frá Ríkisumboðsmanninum avgera, at einans partur av rentunum verður útgoldin, um samlaða inntøkan ivaleyst má metast at fara upp um tað, sum tann, sum er undir verju, tørvar.

**§ 36.** Um umsitingardeildin flýggjar út ogn til verjan sambært § 16, stk. 3, skal umsitingardeildin boða Ríkisumboðsmanninum frá hesum.

**§ 37.** Tá verjumálið heldur uppat, skal ognin uttan uppsøgn vera tøk hjá tí, sum var undir verju, ella deyðsbúgvi hansara. Bundin ogn verður framhaldandi umsitin í samsvari við ásetingarnar í testamenti, gávubrævi o.l.

## Kapittul 3.
## Eftirlit við umsitingardeildunum og kæra

**§ 38.** Starvsfólk í umsitingardeildunum hava tagnarskyldu um tað, sum tey fáa kunnleika um viðvíkjandi umsiting av ogn.

**§ 39.** Tryggingareftirlitið hevur eftirlit við umsitingardeildunum. Tryggingareftirlitið kann krevja allar upplýsingar frá umsitingardeildunum, sum eru neyðugar fyri eitt fullgott eftirlit.

**§ 40.** Avgerð hjá eini umsitingardeild kann kærast til Tryggingareftirlitið, hvørs avgerð er endalig.

**§ 41.** Grundað á eina tímauppgerð sendir Tryggingareftirlitið árliga uppgerð yvir kostnaðin av eftirliti sambært § 39 og kæruviðgerð sambært § 40 til Innlendismálaráðið.
*Stk. 2.* Ein upphædd at nýta til eftirlit og kæruviðgerð skal hvørt ár verða avtalað frammanundan við Innlendismálaráðið. Metir Tryggingareftirlitið í árinum, at avtalaða upphæddin ikki kemur at røkka, skal Tryggingareftirlitið sum skjótast boða Innlendismálaráðnum frá hesum.

## Kapittul 4.
## Gildiskoma

**§ 42.** Hendan kunngerð kemur í gildi 1. mai 2010.

Innlendismálaráðið, 27. apríl 2010

**Annika Olsen (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Rúni Joensen (sign.)

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705